NVD *Rit*

SERRITGERÐ
Thesis

**TØKNIFRÁGREIÐING**
Technical Report

UNDIRVÍSINGARTILFAR
Teaching Material

UPPRIT
Notes

# Haruveiðan í Føroyum 2014

## og annað tilfar um føroysku haruna

*Hunting of hare in the Faroe Islands in 2014*
*and other information on Faroese hare*

**Eyðfinn Magnussen**




NVD*Rit* 2015:01

NÁTTÚRUVÍSINDADEILDIN
Faculty of Science and Technology
FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
University of the Faroe Islands

Heiti / *Title* **Haruveiðan í Føroyum 2014**

**og annað tilfar um føroysku haruna**

*Hunting of hare in the Faroe Islands in 2014*
*and other information on Faroese hare*


Høvundur / *Author* **Eyðfinn Magnussen**



Ritslag / *Report Type* Tøknifrágreiðing/*Technical Report*

Útgávudagur / P*ublishing Date* 25. februar 2015

*NVD*Rit 2015:01



© Náttúruvísindadeildin og høvundurin



Permumynd / *Cover Picture* Bjarki. G. Dalsgarð

Útgevari / *Publisher* Náttúruvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya



Bústaður / *Address* Nóatún 3, FO 100 Tórshavn, Føroyar (Faroe Islands)

☎ • 🖷 • @ +298 352550 • +298 352551 • nvd@setur.fo

## Innihaldsyvirlit


1. Samandráttur ............................................................ Síða 5

   1.1. Summary (*written in english*) ............................................ 6

2. Haruveiðan í Føroyum ............................................................ 7

3. Innsavning av veiðutølum ............................................................ 8

   3.1 Hvussu fullfíggjað er kanningin? ............................................ 9

4. Hvussu nógvar harur vórðu skotnar í 2014? ............................................ 11

   4.1 Hagapartar ............................................................ 11

   4.2 Oyggj ............................................................ 14

   4.3 Bygd ............................................................ 14

   4.4 Útvaldir dagar ............................................................ 15

   4.5 Veiða dag fyri dag í 2014 og 2013 ............................................ 16

   4.6 Hvussu nógvar harur fingu teir hvønn túrin? ............................................ 17

   4.7 Hvussu nógvir skjúttar vóru við hvønn túrin? ............................................ 18

   4.8 Hvør hevur skotið flestar harur harur í Føroyum ............................................ 18

   4.9 Tvær harur í einum skoti ............................................................ 19

5. Føroyska veðrið í november og desember mánað 2014 ............................................ 20

6. Hvussu stórur er føroyski harustovnurin? ............................................ 22

7. Hvussu nógvir mans skjóta harur í Føroyum? ............................................ 23

   7.1 Konufólk, ið hava skotið harur í Føroyum ............................................ 23

8. Haruskjóting á teimum smærru oyggjunum ............................................ 24

   8.1 Haruskjóting á eystara armi á Skálafjørðinum ............................................ 25

9. Nøkur haruhagtøl til umhugsunar ............................................ 26

10. Verður ov nógv skotið? ............................................................ 27

    10.1 Eitt lítið roknistykkið til umhugsunar ............................................ 27

    10.2 Hvussu kann veiðan avmarkast? ............................................ 28

    10.3 Summastaðni eru avmarkingar ............................................ 28

11. Tíðarskeið, har loyvt er at skjóta haru............................................ 30

    11.1 Veiðitíðin verið skiftandi gjøgnum tíðirnar ............................................ 30

    11. 2 Fyrr skutu teir eisini kvidnar harur ............................................ 31

    11.3 Kanska tolir haran størri veiðitrýst ............................................31

12. Friðing av haru ............................................................ 32

13. Eldri veiðuhagtøl ........................................................................................ 33
11.1 Skálatoftahagi, Skálatoftir ..................................................................... 34
11.2 Presthagin (Heimi í Haga), Norðradalur ................................................. 34
11. 3 Fyri Framman, Fremripartur, Streymnes ............................................... 35
11. 4 Byrgið, Haldarsvík .................................................................................. 35
11.5 Dalkin, Elduvík ........................................................................................ 36
11.6 Prestfjall, Sunnaripartur, Hvalba ............................................................. 36
14. Haruskjóting í Vestmanna ........................................................................... 37
14.1 Sølan av haruhøgunum .......................................................................... 38
14.2 Prísir á haruhøgunum ............................................................................. 39
15. Haruskjóting í Norra ..................................................................................... 41
16. Kaninir í Føroyum ........................................................................................ 42
16.1 Kaninirnar hjá Pedda í Æðuvík ............................................................... 42
16.2 Náttúrugripasavnið ørkymlað um støðuna .............................................. 43
17. Heimildir ...................................................................................................... 45

**Appendix**:

Úrslitini frá teimum einstøku harutúrunum í Føroyum í 2014:
Skipað eftir oyggj, bygd, hagaparti og dato ................................................ síða 46 – 75

## 1. Samandráttur

Hetta er triðja royndin at gera eitt yvirlit yvir, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum. Fyrsta royndir var gjørd í 2012.

Í yvirlitinum eru tilsamans 9.318 harur skrásettar at vera skotnar í Føroyum í 2014. Út frá hesum meti eg, at samlaða talið av harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2014, hevur verið umleið 9.400.

Siga vit, at helvtin av harustovninum verður skotin á hvørjum ári, so var samlaði føroyski harustovnurin í 2014 einar 20.000 harur.

Kanningin byggir á tøl frá tilsamans 1.123 harutúrum, sum vórðu gingnir í 348 hagapørtum kring landið. Av samlaðu veiðuni, ið var 9.318 harur, varð helvtin skotin í 47 hagapørtum, av hesum vórðu 2.323 harur, tað er 25 %, skotnar í 16 hagapørtum.

Í 20 teimum bestu haruhøgunum, har flestar harur vórðu skotnar í 2014, fingu teir 2.664 harur tilsaman, sum er 29% av samlaðu veiðuni í Føroyum í 2014.

Raskastir at skóta harur í Føroyum í 2014 vóru teir 'Úti í Haga á Bjørgum' í Vestmanna. Teir fingu tilsamans 214 harur á 11 túrum. Teimum á baki komu teir í 'Norðurtriðingi, Norðaraparti' í Sørvági, við 203 harum, sum teir skutu á 14 túrum. Á triðja plássi vóru teir í Neshaga, eisini í Vestmanna. Teir skutu 202 harur, sum teir fingu á 14 túrum.

Verður hædd tikið fyri, hvussu nógvir túrar vórðu gingnir í hvørjum haga og hvussu nógvir skjúttar vóru við hvønn túrin, broytist úrslitið. Eftir hesi útrokning, lág best fyri í hagapartinum "Fyri Norðan" í Hvannasundi. Í hesum haganum varð bara skotið tann eina dagin, har ein einsamallur maður fekk 11 harur. Næstir vóru teir á Skarðhamri í Hvannasundi, teir fingu í miðal 10,6 harur pr. byrsu pr. dag. Á triðja plássi vóru teir, sum skutu í "Dúvugarðarhaga, Niðanfyri Glyvur" í Saksun, við 9,7 harum pr. byrsu pr. dag.

Fyri alt landið vórðu skotnar 3,1 harur pr. byrsu hvønn dagin. Í 2013 var veiðan 2,9 harur pr. byrsu hvønn dagin.

Flest harurnar vórðu skotnar á Streymoynni, íalt 3.924 harur, sum er 42% av samlaða talinum av harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2014. Í Vágum skutu teir 1.893 harur, í Eysturoynni 1.415 og á Borðoynni 840 harur.

Vestmanna er, eins og í 2012 og 2013, tann bygdin í Føroyum, har flestu harurnar vórðu skotnar í 2014. Tilsamans skutu vestmenningar 1.120 harur í teimum 12 haruhøgunum, sum hoyra til bygdina.

Fyrsta leygardag í harutíðini vórðu skotnar tilsaman 1.703 harur í 103 høgum kring landið. Hetta er 18% av samlaðu haruveiðuni í 2014 og 7% av samlaða túratalinum. Seinasta dag vórðu skotnar 256 harur í 47 høgum.

Á teimum 1.123 harutúrunum, sum vórðu gjørdir í 2014, var veiðan millum 0 og 66 harur hvønn túrin. Vanligast var at fáa 1 til 4 harur á hvørjum túri. Í miðal vórðu 8,12 harur skotnar á hvørjum túri, sum er eitt vet minni enn í 2013, tá miðalveiðan var 8.2 harur pr. túr.

Talið av skjúttum var millum 1 og 17 á hvørjum harutúri í 2014. Helvtin av túrunum vóru 2 skjúttar við í miðal, 337 ferð (30%) var bert ein maður og skeyt.

Mett verður, at í 2014 skutu einir 1.200 ymiskir mans harur í Føroyum.

## 1.1. Summary

This is the third census of hares caught in Faroe Island during the hunting season, from 2 November to 31 December. The first census was conducted in 2012.

The survey is based on data collected, using a Facebook-group named "*Hare hunting in the Faroe Island*", created for this purpose. The group has around 2,000 members. After a hunting expedition, a participant reports the 'Date', 'Name of the respective outfield', 'Number of hares hunted' and 'Number of shooters participated'. The reporting is based on voluntary participation. Then the data is transferred into a database, used for analyzing the data.

The investigation is based on information from 1,123 distinct hunting expeditions carried out in 348 different outfields covering the most of the Faroe Islands.

In the present overview, 9,318 hares are registered shot in the Faroe Islands in 2014. Based on this, I estimate the total number of hunted hares in the Faroe Islands in 2014 has been around 9,400 animals.

Assuming half of the hare population is being hunted each year the total number of hares in the Faroe Islands was around 20,000 in 2014.

Half of the hares were shot in 47 outfields, and 2,323, i.e. 25% of total, in 16 outfields. In the 20 best hunting fields in the Faroe Islands in 2014, they shot in total 2,664 hares, corresponding to 29% of all hare hunted in 2014.

The most successful hare-hunters in the Faroe Islands in 2014 were those from the outfield 'Úti í Haga á Bjørgum' belonging to the village Vestmanna. In total, they shot 214 hares on 11 trips. In second place were those from 'Norðurtriðingi, Norðara parti' in Sørvági, with 202 hares from 14 trips. Number three were those from 'Neshaga' also in village Vestmanna. They got 202 hares on 14 hunting expeditions.

However, if hunting statistics is adjusted by number of trips and shots, then the top-3 list changes. The field 'Fyri Norðan', belonging to the village Hvannasund, would then be the most successful. In this field a single man shot 11 hares on a single trip. Number two would then be the guys hunting in 'Skarðhamri' also in Hvannasundi, shooting 10.6 hares per gun per day. Number three were those from the field 'Dúvugarðarhaga, Niðanfyri Glyvur', belonging to the village Saksun, with 9.7 hares per gun per day.

Overall, 3.1 hares where shot per gun per day in the Faroe Islands in 2014, compared to 2.9 in 2013.

Most hares were shot on the island Streymoy with a total of 3,924, corresponding to 42% of hunted hares in the Faroe Islands in 2014. On the island 'Vágar' 1,893 hares were shot, on 'Eysturoy' 1,415 and on the island 'Borðoy' 840 hares.

The village Vestmanna on the island Streymoy is, as in the previous years, the place where most hares were shot in 2014. In total, they shot 1,120 hares in the 12 outfields belonging to this village.

On the first Saturday in the hunting season (8$^{th}$ November) 1,703 hare were shot in103 fields. This is 18% of the catch in 2014 and 13% of the trips. On the last hunting day (31$^{st}$ December), a total of 256 hares were shot in 47 fields.

On the 1,123 individual hunting trips in 2014, the hunting success ranged from 0 to 66 hares on each trip. The most common success rate was between 1 and 4 hares on a single day. Over the whole season, 8.12 hares were shot in average on a trip, which is slightly less than in 2013, when an average of 8.2 hares were obtained per trip.

The number of shooters ranged from 1 to 17 in 2014 per trip. On half of the trips, an average of 2.0 shooters participated, in 337 cases (30%), the hunter was alone.

It is estimated that approximately 1,200 distinct shooters participated in hare-hunting in the Faroe Islands in 2014.

## 2. Haruveiða í Føroyum

Tað finst einki samlað yvirlit yvir, hvussu nógvar harur hava verið skotnar í Føroyum gjøgnum tíðina. Vanligt er, at haruhagar verða seldir, nakað áðrenn harutíðin byrjar. Sum oftast fyri eitt ár í senn, men tað kemur eisini fyri, at hagarnir verða seldir fyri fleiri ár. Eisini er vanligt, at fjallmenn sleppa at skjóta hjá bóndanum, har teir ganga á fjalli.

Haruveiðan í Føroyum er skipað sambært løgtingslóg nr. 128 frá 25. oktober 1988 um haruveiðu (http://logir.fo/Logtingslog/128-fra-25-10-1988-um-haruveidu--harejagt). Lógin er sera stutt; einans tvær greinar, umframt sektarmøguleikar og gildiskomu. Í § 1 verður ásett, at loyvt er at skjóta haru í tíðini 2. november til 31. desember, báðar dagar viðroknaðar. Stykki tvey og trý í hesi greinini umrøða møguleikan at friða. Í § 2 verður sagt, at haruveiðan má bert fara fram í dagsljósi gerandisdagar, og loyvt er bert at nýta høglbyrsu. Annars eru ongar bindingar í lógini, og tað er sostatt frítt hjá harumonnum at skjóta í tí hagapartinum, har teir antin hava fingið ella keypt sær rættindi í veiðutíðini.

Snjóhara (*Lepus timidus*) varð innflutt til Føroya í 1855 og 1858 frá norsku oynni Kragerø, sum er í Oslofjørðinum – 4 harur hvørja ferðina. Harurnar vórðu settar út í Hornabø í Tórshavn og runnu niðan á Kirkjubøreyn. Tær vuksu skjótt í tali, og vórðu síðan fluttar til hinar oyggjarnar. Í dag finst haran á øllum oyggjunum uttan í Koltri, Stóru Dímun og Lítlu Dímun.

Nøkur ár eftir at haran var innflutt til Føroyar, fóru menn at skjóta harur. Teir ið skjóta haru í Føroyum, hava ikki skyldu at boða frá, hvussu nógvar harur teir hava fingið, hvussu ofta teir hava skotið ella hvussu nógvir mans hava verið við. Tí vita vit heldur ikki, hvussu nógv hara hevur verið skotin í Føroyum gjøgnum tíðina, ella hvussu stór royndin hevur verið.

Tað eru tó nógvir harumenn, sum hava stóran áhuga fyri haruveiðu og skriva tí niður, hvussu nógvar harur teir fáa; antin fyri hvønn einstakan dag, sum skotið hevur verið, ella samlaða talið av harum, sum vórðu skotnar í veiðutíðini. Hesar upplýsingar um haruveiðu liggja ymsastaðni kring landið, uttan tó at vera savnaðir saman.

Hetta er triðja royndin hjá mær at fáa fatur á upplýsingunum um haruveiðuna í Føroyum, so til ber at fáa eitt yvirlit yvir, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum. Fyrsta royndin varð gjørd í 2012, og úrslitini frá tí kanningini vórðu samlaði í frágreiðingini "***Haruveiðan í Føroyum 2012***", sum kann lesast her. Næsta frágreiðingin var "***Haruveiðan í Føroyum 2013***", og kann lesast her.

Fyrsta árið vórðu 5.381 harur skrásettar, sum vórðu skotnar á 649 túrum í 199 hagapørtum kring landið. Í 2013 vórðu skrásettar 7.7561 harur, sum vórðu skotnar á 904 túrum í 269 hagapørtum.

## 3. Innsavning av veiðutølum

Haruhagtølini, sum eru við í hesi frágreiðingini, koma frá 366 ymiskum heimildarfólkum kring landið. Innsavningin av veiðitølunum í hesi frágreiðingini byggir á upplýsingar, sum eru fingnar frá harumonnum kring landið. Innsavningin av veiðitølum er í størstan mun farin fram við Facebook-bólkinum "Haruskjóting í Føroyum". Hetta er ein afturlatin bólkur, sum 4. februar 2015 hevði 1.808 limir. Bólkurin er alsamt í vøkstri. 25. januar 2013 hevði bólkurin 672 limir og 13. februar 2014 vóru 1.251 limir í bólkinum

Á hesi síðuna skriva limirnir, hvussu nógvar harur teir hava fingið hvønn dagin, t.d. kann NN skriva:

NN:
31. desember. Sjóvarhagi, Niðari partur (Kollafjørður). 4 mans 17 harur

Hesi tølini verða so førd yvir í eitt rokniark, við hesum upplýsingum:

- Oyggj
- Bygd
- Hagapartur
- Dato
- Tal av harum
- Tal av byrsum
- Heimildarfólk
- Viðmerking

Í summum førum kann tað vera eitt sindur torført at halda skil á nøvnunum á hagapørtunum, tí ofta verða fleiri ymisk nøvn brúkt um sama hagapart. Ofta verður hagin nevndur eftir tí størsta fjallinum, í haganum, t.d. Slættaratindur, Koppenni, Nøvan ella Vørufelli. At skráseta sama hagapart við ymiskum nøvnum í eini databasu gevur trupulleikar, tí tá uppfatar databasan teir sum ymiskar hagapartar. Fyri at hetta ikki skal henda, havi eg hildið meg til tey "formellu" nøvnini á hagapørtunum; tað eru nøvnini, sum Matrikulstovan brúkar. Á hendan hátt gerast skrásetingarnar eintýðugar.

Eftir at veiðitíðin var liðug, varð eisini ringt til bøndur og harumenn, sum eg var vitandi um, ella hevði frætt um, høvdu skotið harur í 2014. Kollfirðingurin Jóan Karl Joensen var so beinasamur, at átaka sær arbeiðið at tryggja, at øll tølini yvir haruveiðuna í hagapørtunum, sum hoyra til bygdina Kollafjørð, eru við í yvirlitinum. Hesum eri eg honum sera takksamur fyri. Eftir at harutíðin var liðug, hevur Bjarki G. Dalsgarð verið so beinasamur, at gera eitt kort yvir hagapartarnar, sum tøl eru komin inn fyri (Mynd 3.1). Eisini hesum eri eg takksamur fyri.

Samandráttur av úrslitunum frá innsavningini er víst í talvu 3.1. Umframt upplýsingar frá teimum 1.123 einstøku túrunum, sum vórðu skrásettir, eru eisini upplýsingar fyri samlaða talið av harum, sum vórðu skotnar í 5 øðrum hagapørtum og eisini upplýsingar um 38 hagapartar, har teir ikki hava skotið harur í 2014. Eisini eru upplýst fyri tveir hagapartar, at teir hava skotið, men talið er ókent. Samlaða talið kemur sostatt upp á 1.168 skrásetingar fyri árið 2014.

| | |
|---|---:|
| Tal av skotnum harum | 9.318 |
| Tal av harutúrum | 1.123 |
| Tal av hagapørtum | 348 |
| Tal av bygdum | 88 |
| Tal av oyggjum | 15 |
| Tal av heimildarfólkum | 366 |

***Talva 3.1:*** *Upplýsingar um harutølini, sum vórðu savnaði saman fyri veiðitíðina 2014.*

### 3.1 Hvussu fullfíggjað er kanningin?

Kanningin byggir á upplýsingar frá 1.168 skrásetingum í 348 ymiskum hagapørtum kring landið. Eg havi tó neyvan fingið fatur á øllum harutúrunum, sum vórðu gjørdir í Føroyum í 2014. Spurningurin er so, hvussu stórum parti av veiðitølunum, tað er eydnast mær at fáa fatur á?

Fyri at meta um hetta, havi eg gjørt eitt yvirlit, sum vísir, hvussu nógvir hagapartar eru í teimum 15 oyggjunum, har hara finst, og úr hvussu nógvum av hesum hagapørtunum eg havi fingið harutøl frá í veiðutíðini í 2014. Úrslitini eru víst í talvu 3.1.




***Mynd 3.1:*** *Yvirlit yvir hagapartar í Føroyum, har upplýsingar um haruveiðuna í 2014 eru fingnir. Tilsamans eru upplýsingar fingnar fyri 348 av teimum íalt 454 hagapørtunum, sum eru í Føroyum. Tað er 77 %. Í Koltri, Stóru Dímun og Lítlu Dímun eru ongar harur (Kort: Bjarki. G. Dalsgarð)*

Í Føroyum eru tilsamans 454 hagapartar, har møguligt er at skjóta haru (Mynd 3.1 og Talva 3.2). Eingin hara er í Koltri, Stóru Dímun og Lítlu Dímun. Flest hagapartar eru í Eysturoynni (113), Streymoynni (82) og í Suðuroynni (78). Í hesi kanningini eru harutøl fingin fyri tilsamans 348 hagapartar, sum svarar til 77 % av øllum hagunum í Føroyum.

Í 2013 fekk eg fatur á tølum frá 269 hagapørtum, sum svarar til 57 %. Sostatt eru 79 fleiri hagapartar við í hesi kanningini, samanborið við 2013.

Kanningin av haruveiðuni í Føroyum í 2014 er sera væleydnað. Fyri 10 av teimum 15 oyggjunum, har møguleiki er at skjóta harur, er tað eydnast at fáa upplýsingar um haruveiðuna í øllum hagapørtunum, sum eru í oynni. Talan er um oyggjarnar: Fugloy, Svínoy, Viðoy, Kunoy, Streymoy,Vágar, Mykines, Hestur, Nólsoy og Skúgvoy (Mynd 3.1 og Talva 3.2). Í Borðoynni manglar ein hagapartur (Innistovuhagi).

Í Eysturoynni eru 78% av høgunum komnir við, meðan tað fyri Kalsoynna, Sandoynna og Suðuroynna mangla fleiri hagapartar.

| **Oyggj** | **Tal av markatals-bygdum** | **Tal av høgum** | | **%** |
|---|---|---|---|---|
| | | **á oynni** | **Við haru-tølum** | |
| Fugloy | 2 | 8 | 8 | 100 |
| Svínoy | 1 | 8 | 8 | 100 |
| Viðoy | 2 | 16 | 16 | 100 |
| Borðoy | 8 | 25 | 24 | 96 |
| Kunoy | 3 | 10 | 10 | 100 |
| Kalsoy | 4 | 22 | 13 | 59 |
| Eysturoy | 20 | 113 | 88 | 78 |
| Streymoy | 19 | 82 | 84 | 102 |
| Vágar | 5 | 38 | 38 | 100 |
| Mykines | 1 | 4 | 4 | 100 |
| Hestur | 1 | 2 | 2 | 100 |
| Nólsoy | 1 | 3 | 3 | 100 |
| Sandoy | 5 | 40 | 13 | 33 |
| Skúgvoy | 1 | 5 | 5 | 100 |
| Suðuroy | 10 | 78 | 32 | 41 |
| **Samlað** | **83** | **454** | **348** | **77** |

***Talva 3.2****: Tal av markatalsbygdum á hvørjari oyggj har hara finst og talið av hagapørtum, sum hoyra til bygdirnar. Hara er ikki í Koltri, Stóru Dímun og Lítlu Dímun. Høgrumegin sæst talið av hagapørtum, sum eru við í uppteljingini av haruveiðuni í Føroyum í 2014, og hvussu stóran prosentpart hetta svarar til, í mun til talið av høgum, sum eru í oynni. Markatalsbygdir eru bygdir, ið nevndar eru í elstu jarðarbókum.*
*Fyri Streymoynna er prosentparturin '102%'. Hetta kemst av, at tveir av hagapørtunum verða sundurbýttir til haruskjóting.*

## 4. Hvussu nógvar harur vórðu skotnar í 2014?

Sambært hesi skrásetingini, vórðu tilsaman 9.318 harur skotnar í Føroyum í 2014.

Hetta talið er tó ikki heilt fullfíggjað, tí tað eru helst onkur smávegis harutøl, sum tað ikki er eydnast mær at fáa fatur á. Eg haldi tó, at eg havi fingið fatur á teimum allar flestu tølunum, í øllum førum teimum týdningarmestu. Tað vísir seg, at á teimum túrunum, har tað hevur gingist væl, og teir hava fingið nógvar harur, tá koma tølini eisini skjótt inn. Á teimum túrunum, har tað hevur gingist minni væl, er ofta verri at fáa tølini. Í januar mánað havi eg ringt og spurt um úrslitini i høgum, har eg ikki hevði fingið nøkur tøl. Tá vísti tað seg ofta, at teir høvdu skotið, og kanska bara verið tann eina túrin, har teir høvdu fingið eina til tvær harur. Eg rokni tí við, at tær 9.318 harurnar, sum eru skrásettar fyri 2014, í tali er nær við 100% av øllum harunum, sum vóru skotnar.

Samlaða talið av harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2014, er tí neyvan nógv meira enn 9.400 harur.

### 4.1 Hagapartar

Tað er sera ymiskt hvussu nógvar harur vórðu skotnar í teimum ymisku høgunum kring landið (Mynd 4.1). Av teimum 334 sjálvstøðugu hagapørtunum, har skotið varð í 2014, varð helvtin av samlaðu árligu veiðuni skotin í 47 ymiskum hagapørtum, av hesum vórðu 25 % av harunum skotnar í 16 hagapørtum, tað eru 2.323 harur. (Mynd 4.2). Tey fyrstu 25% av harunum, har teir fingu fækst harur, vórðu skotnar í 235 hagapørtunum.




***Mynd 4.1:*** *Myndin vísir, hvussu samlaða haruveiðan í 2014 var býtt millum teir ymisku hagapartarnar kring landið*




***Mynd 4.2:*** *Myndin vísir, hvussu stórur partur av teimum 9.318 harunum vóru skotnar í teimum 334 ymisku sjálvstøðugu hagapørtunum kring landið. Tey fyrstu 25% av harunum vórðu skotnar í 235 ymiskum hagapørtum, 50 % í 287 hagapørtum og 75% í 318 hagapørtum.*

Úrslitið fyri teir 20 bestu haruhagarnar í Føroyum í 2014 er víst í talvu 4.1. Í hesum 20 haruhøgunum vórðu skotnar tilsaman 2.664 harur, sum svarar til 29% av øllum harunum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2014.

Raskastir at skóta harur í Føroyum í 2014 vóru teir 'Úti í Haga á Bjørgum' í Vestmanna. Teir fingu tilsamans 214 harur á 11 túrum (Talva 4.1 og Appendix 1). Teimum á baki komu teir í 'Norðurtriðingi, Norðara parti' í Sørvági. Teir fingu 203 harur á 14 túrum. Á triðja plássi vóru teir í Neshaga, eisini í Vestmanna. Teir skutu 202 haru á 14 túrum.

Teir báðir hagarnir, sum vóru bestir í 2014, vóru eisini teir bestu haruhagarnir í 2013. Tá skutu teir líka nógvar harur í báðum hesum høgunum. Vestmenningar brúktu 9 túrar um at skjóta 158 harur men Sørvingar brúktu 10 túrar. Í Neshaga varð munandi minni skotið í 2013, samanborið við 2014. Teir fingu tilsamans 48 harur, sum teir skutu á 5 túrum.

Teir báðir Vestmannahagarnir, sum eru nevndir omanfyri, munnu teljast millum bestu haruhagarnar í Føroyum. Í 1996 skutu teir 146 harur uppá tríggjar túrar í "Útihaganum á Bjørgum", og í 2011 skutu teir 169 harur í 3 dagar í Neshaga. Tað árið fingu teir tilsamans 282 harur í Neshaganum.

Úrslitini frá teimum einstøku harutúrunum í Føroyum í 2014, skipað eftir oyggj, bygd, hagaparti og dato er víst í Appendix á síðu 46 – 75.

| Hagapartur | Bygd | Samlað tal av skotnum harum | Tal av túrum |
|---|---|---|---|
| **1.** Úti í Haga á Bjørgum | Vestmanna | 214 | 11 |
| **2.** Norðurtriðingur, Norðaripartur | Sørvágur | 203 | 14 |
| **3.** Neshagi (Norðurnesið) | Vestmanna | 202 | 14 |
| **4.** Sjeyndir (Norðan Kamb) | Tjørnuvík | 201 | 12 |
| **5.** Dalhagi, Eystaripartur | Vestmanna | 156 | 4 |
| **6.** Heimaraleiti | Miðvágur | 151 | 21 |
| **7.** Brekkurnar | Vestmanna | 140 | 11 |
| **8.** Fjallið (partur av Ognarhaganum) | Kvívík | 134 | 13 |
| **9.** Uttanhús á Fjøllum | Miðvágur | 125 | 8 |
| **10.** Yviri á Skarðhamri | Hvannasund | 121 | 5 |
| **11.** Norðurtriðingur, Sun.partur (Vørðufelli) | Sørvágur | 120 | 9 |
| **12.** Norðuri í Haga (Junkarahagi) | Kvívík | 117 | 10 |
| **13.** Norðurhelvt (Fyri Norðan Á) | Eiði | 116 | 13 |
| **14.** Fyri Heiman (í Gerðum) | Klaksvík | 103 | 12 |
| **15.** Suðurtriðingur, Ytripartur | Sørvágur | 98 | 9 |
| **16.** Skálatoftahagi | Skálatoftir | 97 | 4 |
| **17.** Heimi í Haga á Bjørgum, Vestari | Vestmanna | 95 | 7 |
| **18.** Norðan Á | Haldarsvík | 93 | 16 |
| **19.** Dúvugarðarhagi, Heimanfyri Glyvur | Saksun | 91 | 9 |
| **20.** Áarhagi, Miðrøktin | Kaldbak | 87 | 5 |
| **Samlað** | | **2.664** | **207** |

***Talva 4.1**: Talvan vísir teir 20 hagapartarnar í Føroyum, har flestar harur vórðu skotnar í 2014. Eisini sæst hvussu nógvir túrar vórðu gjørdir í hesum hagapørtunum. Tær 2.664 harurnar, sum vórðu skotnar í hesum 20 hagapørtunum, svarar til 29 % av øllum harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2014.*

Í talvu 4.1 hava vit bert hugt at, hvussu nógvar harur vóru skotnar í hvørjum hagaparti, men ikki mett um innsatsin, sum var gjørdur, fyri at fáa fatur á hesum harunum. Vit vita jú, at tað er rættuliga ymiskt, hvussu nógvir skjúttar eru í hvørjum haga og hvussu nógvir túrar verða gjørdir.

Hvussu nógvar harur, sum verða skotnar í einum hagaparti eitt ávíst ár, er í høvuðsheitum tengt at 6 viðurskiftum:

- Hvussu nógv er til av haru í haganum.
- Hvussu veðurlíkindini eru.
- Hvussu royndir skjúttarnir eru.
- Hvussu nógvir skjúttar eru við.
- Hvussu nógvir túrar verða gjørdir.
- Hvussu langir túrarnir eru.

Hvussu nógv er til av haru, hvussu veðurlíkindini eru, hvussu royndirnar hjá skjúttunum eru og hvussu langir túrarnir eru, fáa vit ikki gjørt nakað við, men í útrokningunum kunna vit taka hædd fyri, hvussu nógvir túrar verða gjørdir og hvussu nógvir skjúttar eru við hvønn túrin. Tá fáa vit eitt úrslit, sum vísir, hvussu nógvar harur eru skotnar pr. dag pr. byrsu. Úrslitini frá hesi útrokningin er víst í talvu 4.2.

Tilsamans vóru 3.209 byrsur í føroysku høgunum í 2014, sum hvør í miðal skeyt 3,1 harur hvønn dagin. Eftir hesum útrokningarháttinum, lág best fyri í hagapartinum "Fyri Norðan" í Hvannasundi. Í hesum haganum varð bara skotið tann eina dagin, har ein einsamallur maður fekk 11 harur. Næstir vóru teir á Skarðhamri í Hvannasundi, sum í miðal fingu 10,6 harur pr. byrsu pr. dag. Í 2013 vóru teir á Skarðhamri á fyrsta plássi við í miðal 7,5 harum pr. byrsu pr. dag.

Á triðja plássi vóru teir, sum skutu í "Dúvugarðarhaga, Niðanfyri Glyvur" í Saksun, við 9,7 harum pr. byrsu pr. dag (Talva 4.2).

| | **Hagapartur** | **Bygd** | **Tal av túrum** | **Tal av harum** | **Samlað tal av byrsum** | **Tal av harum pr. byrsu pr. dag** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.** | Fyri Norðan | Haraldssund | 1 | 11 | 1 | 11,0 |
| **2.** | Yviri á Skarðhamri | Hvannasund | 5 | 121 | 12 | 10,6 |
| **3.** | Dúvugarðarhagi, Niðanfyri Glyvur | Saksun | 3 | 50 | 5 | 9,7 |
| **4.** | Bíggjarhagi, Eystastipartur | Kaldbak | 2 | 27 | 3 | 9,5 |
| **5.** | Ognarhagin | Árnafjørður | 8 | 83 | 10 | 9,4 |
| **6.** | Dalhagi, Heimaripartur | Vestmanna | 1 | 66 | 8 | 8,3 |
| **7.** | Bergið | Árnafjørður | 6 | 75 | 11 | 7,5 |
| **8.** | Rákarhagi | Sandavágur | 1 | 14 | 2 | 7,0 |
| **9.** | Miðhagi + Líðarhagi | Norðoyri | 1 | 14 | 2 | 7,0 |
| **10.** | Inni í Haga, Heimaripartur | Funningur | 4 | 42 | 8 | 6,8 |
| **Samlað fyri alt landið** | | | **1.123** | **9.122** | **3.209** | **3,1** |

***Talva 4.2****: Standardiserað haruveiða. Talvan vísir teir 10 hagapartarnar, har flestar harur vórðu skotnar í 2014, tá hædd verður tikið fyri, hvussu nógvir túrar vórðu gjørdir í hvørjum haga og hvussu nógvir skjúttar vóru við hvønn túrin. Umframt tær 9.122 harurnar, sum vórðu skotnar á teimum 1.123 einstøku túrunum, eru eisini 196 harur skotnar, har hvørki túratal ella tal av byrsum eru upplýst. Hesar íroknað, kemur samlaða harutalið upp á 9.318.*

## 4.2 Oyggj

Eins og í 2012 og 2013, vóru eisini flestu harurnar skotnar í Streymoynni í 2014. Íalt 3.924 harur, sum svarar til 42% av øllum harunum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2014 (Mynd 4.3). Hetta er áleið sami brotpartur sum fyrr. Í 2012 vóru 47% av teimum føroysku harunum skotnar í Streymoynni, í 2013, 45%. Tað var eisini á Streymoynni, at flestu túrarnir vórðu gjørdir, íalt 388 túrar, sum svarar til 35% av samlaða túratalinum í 2014. Í 2012 vórðu 45% av øllum túrunum gjørdir í Streymoynni, í 2013, 41 %. Í Vágum vórðu skotnar íalt 1.893 harur, 1.415 í Eysturoynni og 840 á Borðoynni.

Til samanberingar fyri Vágoynna, kann sigast, at bæði í 1991 og í 1997 vórðu umleið 1.400 haru skotnar tilsamans í Vágunum um árið.




***Mynd 4.3:*** *Myndin vísir, hvussu nógvar harur vórðu skotnar tilsamans í hvørjari oyggj í 2014 (vinstrumegin) og hvussu nógvir harutúrar vórðu gjørdir (høgrumegin).*

## 4.3 Bygd

Vestmanna er uttan iva tann bygdin í Føroyum, har mest verður gjørt burtur úr haruskjóting. Hetta sæst eisini aftur á prísunum, sum hagarnir verða seldir fyri. Tilsamans eru haruhagarnir, sum hoyra til Vestmanna seldir fyri meir enn 2,2 milliónir árini 1966 til 2014 (Sí partin “15. Haruskjóting í Vestmanna” aðrastaðni í hesi frágreiðingini)

Vestmanna var eisini tann bygdin, har flestu harurnar vórðu skotnar í 2014. Tilsaman skutu vestmenningar 1.120 harur á 74 túrum í teimum 12 haruhøgunum, sum hoyra til bygdina (Mynd 4.4). Næstflestar harur skutu teir í Miðvági, 553 harur á 70 túrum. Á triðja plássi er Sørvágur við 496 harum á 42 túrum, fjórða plássi er Sandavágur við 463 harum á 70 túrum.

Í frágreiðingini “Haruveiðan í Føroyum 2012” (partur10.5.1) er greitt frá, at árini 1970-1986 vórðu í miðal 450 harur skotnar í Sandavági. Tær 443 harurnar, sum vórðu skotnar í Sandavági í 2013, og tær 463 harurnar, sum vórðu skotnar í 2014, eru tískil miðalár, samanborið við árini 1970-1986.




***Mynd 4.4:*** *Myndin vísir, hvussu nógvar harur vórðu skotnar í tíggju teimum bestu bygdunum í Føroyum í 2014 (vinstrumegin), og hvussu nógvir harutúrar vórðu gjørdir í hesum bygdunum (høgrumegin).*

## 4.4 Útvaldir dagar

Hóast tað í Føroyum er loyvt at skjóta haru einar 50 dagar um árið, so verður tó mest skotið leygardagar. Á mynd 4.5 er víst, hvussu veiðan var 12 ávísar dagar í veiðitíðini: Fyrsta dag, 7 fylgjandi leygardagar, triðja jóladag og teir tríggjar seinastu dagarnar í árinum, har loyvt er at skjóta haru.

Av teimum tilsamans 1.123 harutúrunum, har dato er givið, vórðu íalt 5.976 harur (74%) skotnar og 55% av túrunum gingnir hesar 12 dagarnar.

Fyrsta dag loyvt var at skjóta harur í 2014 var mánadagin 3. november. Hendan dagin, vórðu tilsamans 1.100 harur skotnar í 75 hagapørtum kring landið. Leygardag 8. desember vórðu skotnar tilsamans 1.703 harur í 113 høgum. Hetta eru 18% av teimum skotnu harunum í Føroyum í 2014 og 7% av samlaða túratalinum.

Teir næstu fýra leygardagarnar, var veðrið vánaligt, og lítið var skotið (sí part 5 í hesi frágreiðingini '*Føroyska veðrið í november og desember mánað 2014*'). Leygardagin 13. november var veðrið hampiligt, og 718 harur vórðu skotnar á 86 túrum kring landið. Tríggjar teir næstu leygardagarnar vóru einar 600 -700 harur skotar á 70-80 túrum kring landið.




***Mynd 4.5:*** *Myndin vísir, hvussu nógvar harur vórðu skotnar 12 ávísar dagar í 2014 (vinstrumegin), og í hvussu nógvum hagapørtum, skotið varð í (høgrumegin). Talan er um fyrsta dag, 7 fylgjandi leygardagar, triðja jóladag og teir tríggjar seinastu dagarnar, loyvt er at skjóta haru.*

### 4.5 Veiða dag fyri dag í 2014 og 2013

Í hesi kanningini er skrásetingin av haruveiðuni gjørd fyri hvønn einstakan dag, sum skotið hevur verið. Tí ber til at gera upp, hvussu veiðan hevur hilnast gjøgnum árið, dag fyri dag. Eisini ber til at samanbera, hvussu veiðan hevur verið í mun til undanfarin ár. Úrslitið frá hesi samanbering er víst á mynd 4.6.




***Mynd 4.6:*** *Myndin vísir talið av harum ( ——— ), sum eru skotnar hvønn dagin í veiðutíðini, 3. november til 31. desember, og hvussu nógvir túrar eru gjørdir teir einstøku dagarnar (- - - - - ). Úrslitið fyri 2014 (**reyðu linjurnar**) er samanborið við 2013 (bláu linjurnar). Fyri 10 av túrunum var einki dato uppgivið. Fyri summar av hagapørtunum er bara tað samlaða talið av harum uppgivið. Samlaða úrslitið fyri 2014 gjørdist sostatt, at **9.318 harur** vórðu skotnar á 1.123 túrum.*

Í 2014 var fyrsti dagur, har loyvt var at skjóta harur, mánadagur 3. november. Hendan dagin, vórðu tilsamans 1.100 harur skotnar í 75 hagapørtum kring landið (Mynd 4.5). Í 2013 fall tað soleiðis, at fyrsti dagur, tá loyvt var at skjóta harur (2. november), var ein leygardag. Tá líkindini at skjóta harur eisini vóru framúr góð hendan dagin, vóru eisini nógvir mans í fjøllunum. Skotnar vórðu tilsamans 2.458 harur á 122 túrum kring landið (Mynd 4.5 og 4.6) . Í 2012 vórðu 1.304 harur skotnar á 93 túrum tann fyrsta leygardagin í árinum, har loyvt var at skjóta haru (3. november).

Samanbera vit haruveiðuna í 2014 við 2013 (Mynd 4.6), síggja vit, at munurin var serliga í fyrsta degi, sum hilnaðist munandi betri í 2013 enn í 2014, meðan tær tríggjar seinastu vikurnar vóru munandi betri í 2014 enn í 2013. Annars hevur gongdin verið hin sama tey bæði árini.

### 4.6 Hvussu nógvar harur fingu teir hvønn túrin?

Á teimum 1.123 harutúrunum, sum vórðu gjørdir í 2014, var veiðan millum 0 og 66 harur hvønn túrin (Mynd 4.7). Tað vanligasta var at fáa 1-4 harur á hvørjum túri. Hetta var veiðan á 44% av túrunum. Í 2013 var hetta veiðan 42% av túrunum. 117 túrar vóru, har teir bara hava fingið 1 haru, 149 túrar eru við 2 harum og 115 túrar fingu teir 3 harur. Í miðal vórðu skotnar 8.12 harur á hvørjum túri í 2014. Hetta er eitt ánilsi minni enn í 2013, tá miðalveiðan var 8.2 harur pr. túr.

Einans 9 túrar eru uppgivnir, har teir onga haru siga seg at hava fingið. Men hetta talið er uttan iva alt ov lágt, tí tað eru helst fleiri bummtúrar, sum ikki eru uppgivnir. Tað liggur til lyndið í veiðimanninum, at tað fellur honum lættari at tosa um teir góður túrarnar. Túrarnir, har tú onki fekk, eru hinvegin knapt so spennandi at fortelja øðrum um.




***Mynd 4.7:*** *Myndin vísir hvussu nógvar harur vórðu fingnar á hvørjum túri á teimum 1.123 harutúrunum, sum vórðu gjørdir í 2014.*

Úrslitið av teimum fimm bestu harutúrunum, sum vórðu gjørdir í 2014, eru vístir í talvu 4.3. Her sæst, at tað var eisini í Vestmannahøgunum, at teir bestu harutúrarnir vórðu gjørdir: Í "Dalhaga, Heimaripartur" fingu teir 66 harur tann eina túrin, og í hinum Dalhaganum í Vestmanna, "Dalhaga, Eystaripartur", fingu teir 64 harur ein túr. Triðbesti túrurin varð gjørdur í Skálatoftahaga, har 7 mans fingu 63 harur (Talva 4.3).

| **Hagapartur** | **Bygd** | **Dato** | **Tal av harum** | **Tal av monnum** |
|---|---|---|---|---|
| Dalhagi, Heimaripartur | Vestmanna | 8. nov. | 66 | 8 |
| Dalhagi, Eystaripartur | Vestmanna | 12. des. | 64 | 9 |
| Skálatoftahagi | Skálatoftir | 13. des. | 63 | 7 |
| Yviri á Skarðhamri | Hvannasund | 8. nov. | 61 | 7 |
| Fjallið (partur av Ognarhaganum) | Kvívík | 8. nov. | 60 | 10 |

***Talva 4.3****: Fimm teir bestu harutúrarnir, sum vórðu gjørdir í 2014.*

### 4.7 Hvussu nógvir skjúttar vóru við hvønn túrin?

Talið av skjúttum, sum vóru við á harutúrunum í 2014, var millum 1 og 17. Helvtina av túrunum (medianurin) vóru 2,0 skjúttar við. Sæð yvir alla veiðitíðina, var tað mest vanliga, at ein einsamallur maður var og skeyt (Mynd 4.8). Hetta hendi 337 túrar (30%). 279 túrar (25%) vóru tvær byrsur.

Tá flest mans skutu á einum túri, vóru teir 17. Hetta hendi á tveimum túrum: Á Klappjaktini í Trongisvági 5. november, har teir fingu 58 harur, og í felagsskjóting í Nólsoy, 8. november, har teir fingu 55 harur. 13 mans fingu 22 harur á einum túri í Fámjin og í Brekkunum í Vestmanna fingu 12 mans 47 harur.




***Mynd 4.8:*** *Myndin vísir býtið av talinum av skjúttum, sum vóru við á teimum 1.123 harutúrunum, sum vórðu gjørdir í Føroyum í 2014.*

### 4.8 Hvør hevur skotið flestar harur í Føroyum?

Í innsavningini av harutølum, er bert skrásett, hvussu nógvar harur vóru skotnar í hvørjum hagaparti hvønn dagin. Einki verður sagt um, hvussu nógvar harur hvør einstakur harumaður hevur skotið.

20. desember 2014 fekk ein einsamallur maður (Jákup Hansen) 38 harur á einum túri í Árnafirði; 30 í Ognarhaganum og 8 í grannahaganum “Bergið”. Hetta man vera føroyskt met. 38 harur viga uml. 120 kg. Jákup mátti tí ganga fleiri ferðir fyri at fáa fongin heim til húsa. Eisini kom ein bátur fram við, sum tók nakrar av harunum.

8. desember 2014 fekk ein einsamallur maður 16 harur á einum túri í hagapartinum ‘Úti í Haga á Bjørgum’ í Vestmanna. 13. desember 2014 fingur 7 mans 63 harur í Skálatoftahaga á Borðoynni, besti skjúttin fekk 27 harur.

Tá reypað verður, fær man ymiskt áhugavert at vita frá fólki. Ein maður fortaldi mær, at fyri fleiri árum síðani hevði George í Leynum verið einsamallur og skotið og fingið 31 harur ein dag. Sami maður fortaldi mær eisini, at Tummas Reinert, sum var postmaður í Norðradali eitt árið í tríggjar fylgjandi dagar hevði skotið 72 harur tilsamans.

**Sámal Jákup Egholm úr Streymnesi:** Ein maður úr Hvalvík ringdi til mín ein dagin, og fortaldi mær, at eitt árið, tað hevur nokk verið fyrst í 1940'itinum hevði ein maður í Streymnesi, Sámal Jákup Egholm, skotið 47 harur. Hetta var á einari klappjakt, sum teir høvdu í Streymnesi, har teir skutu í øllum hagapørtunum, sum hoyra til bygdina. Tilsamans fingu teir 139 harur hendan dagin. Um hendan túrin skuldi Sámal Jákup sjálvur seinri hava sagt, at hetta var bæði tann besti og samstundis tann ringasti harutúrurin, sum hann nakrantíð hevði gjørt: Besti, tí hann ongantíð fyrr hevði skotið so nógvar harur ein dag, og ringasti, tí tað seinri skuldi vísa seg, at hann misti allar harurnar. Hendan sama dagin høvdu tveir aðrir menn í bygdini, brøðurnir, Theodor og Jens Egholm, skotið harur Oman Glyvur í Dúvugørðum í Saksun. Teir høvdu fingið 72 harur hendan dagin. Tilsaman vóru sostatt einar 220 harur komnar til Streymnesar hendan dagin, og spurningurin var nú, hvat teir skuldu gera við allar hesar harurnar. Hendan sama dagin var ein húsasmiður úr Havn norðuri í Streymnesi og smíðaði. Hesin bjóðaði seg til at taka harurnar við sær til Havnar og selja harurnar fyri teir. Sum sagt so gjørt, men Sámal Jákup segði, at hann ongantíð fekk nakrar pengar fyri harurnar. So hóast hesin harudagurin var tann besti, sum Sámal Jákup nakrantíð hevði havt, so var hann eisini tann ringasti.

Men framvegis er hetta, sum er skrivað omanfyri lítið at reypa av, tá samanborið verður við Cornelius Reinert í Kaldbak. Í Fuglaframa frá 1902 skrivar Sverri Patursson:

> "*Cornelius hevur skotið í 44 ár* (Hann er sostatt byrjaður at skjóta í 1858; trý ár eftir at fýra tær fyrstu harurnar vórðu settar út í Hornabø í Tórshavn, mín viðmerking). *Hann byrjaði at reika við byrsuni sum 13 ára gamal piltur; nú er hann 57. Mangan fuglin og manga haruna hevur hann niðurlagt. Hann hevur skotið 500 harur á einum ári." „Fyrst, ið eg fór at skjóta, vóru fyri uttan meg bara tveir ella tríggir mans í Streymoynni, sum gingu á haruveiði. Tá komu harurnar til 18 merkur* (ein mørk er 250gr, tvs. 18 merkur eru 4,5 kg, mín viðmerking)*, meðan tær nú sjáldan koma til 14-15. Og tá vóru tær snjóhvítar, meðan tær nú eru bláar. Ikki uttan hendinga hara er nú heilt hvít.*"

### 4.9 Tvær harur í einum skoti

Í ár fekk ein harumaður tvær harur í einum skoti í hagapartinum "Fyri Heiman í Gerðum" í Klaksvík. Tað sama hendi eisini hjá einum harumanni, sum skeyt í haganum Skarðhamri í Hvannasundi í 2013.

## 5. Føroyska veðrið í november og desember mánað 2014

Flestu harumenn vita, at veiðan í stóran mun er tengd at veðrinum í veiðitíðini. Eisini hevur tað sjálvsagt týdning, hvussu nógv er til av haru.

Í Føroyum eru fleiri veðurstøðir, sum dagliga máta veðrið. Mátingar av føroyska veðrinum eru tøkar heilt aftur til 1875.

Í dag eru veðurmátingarnar tøkar á netinum hjá Danmarks Meteorologiske Institut (DMI), har til ber at hyggja hvussu veðrið hevur verið eitt ávíst tíðarskeið. (http://www.dmi.dk/faeroeerne/arkiver/vejrarkiv/) Eg havi tikið fram mátingarnar, sum eru gjørdar fyri november og desember mánað í 2014 í Tórshavn, tí staðið er nøkurlunda umboðandi fyri alt landið, um tó ikki helt neyvt. Við støði í hesum veðurmátingunum, ber til at knýta haruveiðuna saman við veðrinum.

Niðanfyri verður greitt frá, hvussu veðrið í Føroyum var í november og desember mánað í 2014 (Myndirnar 5.1 - 5.6). Hugtakið “Vanligt”, er miðaltøl fyri mánaðin árini 1961-1990.




| | JAN | FEB | MAR | APR | MAJ | JUN | JUL | AUG | SEP | OKT | NOV | DEC |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nedbør (mm) | 163 | 140 | 135 | 132 | 79 | 43 | 71 | 72 | 95 | 157 | 99 | 192 |
| Nedbørdage | 27 | 24 | 22 | 14 | 12 | 4 | 12 | 13 | 17 | 21 | 18 | 29 |
| Dagtemp. | 7.0 | 6.4 | 7.9 | 8.4 | 9.5 | 12.7 | 14.0 | 13.8 | 13.2 | 10.1 | 9.4 | 6.6 |
| Middeltemp. | 5.9 | 4.9 | 5.9 | 6.6 | 7.5 | 10.3 | 11.9 | 11.4 | 11.3 | 8.4 | 8.2 | 4.1 |
| Nattemp. | 4.3 | 3.0 | 3.5 | 4.7 | 5.5 | 8.8 | 10.0 | 9.2 | 9.3 | 6.2 | 6.5 | 1.6 |
| Solskinstimer | 16 | 38 | 63 | 80 | 132 | 92 | 130 | 128 | 68 | 62 | 27 | 21 |

***Mynd 5.1:*** *Føroyska veðrið, mánað fyri mánað, í 2014. Mátingarnar eru gjørdar í Tórshavn. Regndagar (nedbørsdage) eru dagar, har tað regnar 1 mm ella meira í ein dag (Kelda: DMI).*

Veðrið var hampiligt fyrstu vikuna í harutíðini. Ættin var millum vestan og norðan, lítil vindur og turt. Restin av november mánað var ættin fyri tað mesta eystan og sunnan, og lítið varð skotið av haru. Í desember mánað broyttist vindurin. Ættin var fyri tað mesta millum útsynning og norðan við kavaveðrið. Um veðrið í desember mánað, sigur veðurmaðurin Hanus Kjølbro soleiðis í Sosialinum 6. februar 2015. “*....at í desember mánað í 2014 sóu vit eitt eyðkent mynstur í veðurlagnum. Tá fingu vit lágtrýst, sum fóru av leiðunum við Ný Funnland og eystur Kappan, hagani tað fór tvørtur um Ísland í ein lágan landnyrðing. Veðrið í Føroyum varð myndað av høgætt í nakrar dagar. Vit høvdu tveir ella tríggjar dagar við kava, og síðani eina ella tveir dagar við eini sjey hitastigum. Soleiðis gekk mynstrið, tað eina fyri og annað eftir, men á jólum steðgaði mynstrið......*” Hetta mynstrið sæst eisini týðiligt á mynd 5.3 og 5.4.

Novembermánaði var lýggjur. Miðalhitin fyri november var 8,2 $^{0}$C, sum er 3,7 gradir heitari enn vanligt (4,6 $^{0}$C). Miðalhitin í desember mánað var 4,1 $^{0}$C. Hetta er slaka hálva grad heitari enn vanligt. Langtíðarmiðalhitin fyri desember mánað er 3,7 $^{0}$C.

Íalt vóru 18 avfalsdagar í november mánað, har tað tilsamans regnaði 99 mm, sum er undir miðal, ið er 127 mm. Í desember vóru tað einans 2 dagar uttan avfall. Tað regnaði tilsaman 192 mm í desember mánað, sum er væl yvir miðal, ið er 142 mm.




***Mynd 5.2:*** *Vindur (m/s) í november (vinstrumegin) og desember mánað (høgrumegin) í 2014, mátað í Tórshavn. ——: Miðal fyri 6 tímar, ●: Hvirlur. Vanliga miðalvindferðin fyri november er 6,5 m/s og fyri desember 7,1 m/s. (Kelda: DMI).*




***Mynd 5.3:*** *Ættin í november (vinstrumegin) og í desember mánað í 2014 (høgrumegin) í Tórshavn, mátað sum miðal í 6 tímar (Kelda: DMI).*




***Mynd 5.4:*** *Regnmongdin í Tórshavn í november (vinstrumegin) og desember mánað 2014 (høgrumegin). Samlaða regnmongdin í november var 99 mm (vanligt: 127 mm) og í desember 192 mm (vanligt: 142 mm). (Kelda: DMI.)*




***Mynd 5.5:*** *Mesti og minsti hitin mátaður í døgninum í november (vinstrumegin) og desember mánað 2014 (høgrumegin) í Tórshavn. Miðalhitin fyri november var 8,2 $^{0}$C (vanligt: 4,6 $^{0}$C) og fyri desember 4,1 $^{0}$C (vanligt: 3,7 $^{0}$C). (Kelda: DMI).*




***Mynd 5.6:*** *Sóltímar í Tórshavn í november (vinstrumegin) og desember mánað (høgrumegin) 2014. Íalt vóru 27 sóltímar í november (vanligt 20 tímar) og 21 sóltímar í desember (vanligt 7 tímar). (Kelda: DMI).*

## 6. Hvussu stórur er føroyski harustovnurin?

Fyrr hevur tað ofta verið frammi, hvussu nógvar harur munnu verða skotnar í Føroyum um árið og hvussu nógvar harur tilsamans munnu vera í Føroyum.

Tað hevur tó ikki verið møguligt at svara hesum spurninginum, tí eingin skráseting hevur verið av, hvussu nógv hevur verið skotið, og tað er heldur ongantíð gjørd nøkur nágreinilig kanning av, hvussu stórur føroyski harustovnurin er.

Í 2012 varð fyrsta royndin gjørd at skráseta, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum. Úrslitini frá hesi kanningini kom út í frágreiðingini "*Haruveiðan í Føroyum 2012*". Kanningini vísti, at tá vórðu einar 7.000 harur skotnar í Føroyum. Út frá hesum talinum varð varliga mett, at føroyski harustovnurin í 2012 var umleið 14.000 harur. Kanningin var endurtikin í 2013, og tá varð mett, at føroyski harustovnurin var einar 16.000 harur.

Um vit brúka sama framferðarhátt sum í 2012 og 2013, og siga, at helvtin av stovninum verður skotin á hvørjum ári, so var føroyski harustovnurin í 2014 var umleið 20.000 harur.

Í bókini "Villini súgdýr í Útnorðri" verður sagt (s.177), at hildið verður, at føroyski harustovnurin er einar 5.000 harur. Hetta talið er tó alt ov lágt, tí sambært mínum tølum, so vórðu einar 9.400 skotnar í Føroyum í 2014, 8.000 harur í 2013 og 7.000 í 2012.

Tá hendan kanningin varð gjørd fyrstu fer í 2012, varð sagt, at tað árið var serstaka vánaligt til haru. Nógvir harumenn, sum eg tá tosaði við søgdu, at teir í 2012 bara høvdu fingið umleið helvtina av tí, sum teir vanliga plagdu at fáa. Hetta man tó neyvan hava verið heilt rætt, tí kanningarnar bæði í 2013 og í 2014 vísa, at samlaða talið av haru, sum verða skotnar í Føroyum, liggur um tær 9.000 harurnar.

Metingin av støddini á føroyska harustovninum, sum er gjørd omanfyri, skal tó takast við einum ávísum fyrivarni, tí fortreytin um, at helvtin av samlaða stovninum verður skotin á hvørjum ári, er í veruleikanum ikki kend. Hin fortreytin, at 9.400 harur vórðu skotnar í Føroyum í 2014, haldi eg tó er rímiliga eftirfarandi, tí eg haldi meg hava fingið fatur á meginpartinum av veiðitølunum.

Eitt rímilig tal fyri støddina á Føroyska harustovninum er tí, at hann var einar 20.000 harur í 2014.

## 7. Hvussu nógvir mans skjóta harur í Føroyum?

Í hesi frágreiðingini er greitt frá, at í 2014 vóru einar 9.400 harur skotnar í Føroyum, men hvussu nógvir mans hava verið við at skotið hesar harurnar?

Hetta vita vit heldur ikki, tí vit hava ongi tøl um hetta. Men um vit taka útgangsstøði í teimum harutølunum, sum eg havi savnað saman fyri 2014 (Talva 3.1), kunnu vit gera eina meting av, hvussu nógvir mans hava luttikið í haruskjótingini í Føroyum í 2014.

**Tal av heimildarfólkum**: Í frágreiðingini eru 366 ymisk heimildarfólk, sum hava latið mær upplýsingar. Talið av teimum, sum skjóta er í øllum førum nógv hægri enn 366, tí tað er bert eitt heimildar fólk fyri hvønn túrin, hóast tað vóru fleiri mans, sum skutu.

**Hægsta tal av skjúttum í hvørjum hagaparti:** Tilsamans vórðu gjørdir 1.123 túrar, sum vórðu gingnir í 336 sjálvstøðugum hagapørtum kring landið. Um vit taka 'hægsta talið av skjúttum', sum vóru við á einum túri í hesum 336 hagapørtunum, og leggja hesar skjúttarnar saman fyri allar hagapartarnar, fáa vit eitt gott mát fyri, hvussu nógvir ymiskir mans skutu harur í Føroyum í 2014.

Hetta roknistykkið gevur 1.222 mans.

Onkur av hesum monnunum hevur helst skotið í fleiri hagapørtum, men tað mest vanliga er, at hvør maður bert skjýtur í einum haga.

Niðurstøðan er tí, at:

**einir 1.200 mans skutu harur í Føroyum í 2014.**

Sama roknistykkið fyri 2013 vísti, at tá skutu 1.044 mans harur í Føroyum.

### 7.1 Konufólk, ið hava skotið harur í Føroyum

 Eg havi onkuntíð sóknast eftir konufólki, sum hava skotið harur í Føroyum. Ikki eru tað nógvar eg havi frætt um; einar tríggjar ella fýra. Men nýliga ringdi ein eldri kona til mín, og fortaldi, at mamma hennara sum ung plagdi at skjóta harur saman við manninum. "*Tað eina árið fekk hon tvær harur í einum skoti. Hetta hevur verið áðrenn 1916. Tí hetta árið fekk hon sítt fyrsta barn, og tá gavst hon at skjóta harur*" segði hendan eldri konan fyri mær.

## 8. Haruskjóting á teimum smærru oyggjunum

Haran, sum í dag er í Føroyum, snjóhara, *Lepus timidus*, varð upprunaliga innflutt til Føroya í 1855 og 1858 frá norsku oynni Kragerø, sum er í Oslofjørðinum. Harurnar vórðu settar út í Hornabø í Tórshavn og runnu niðan á Kirkjubøreyn. Tær vuksu skjótt í tali, og vórðu síðani fluttar til hinar oyggjarnar. Í dag finst hara á øllum oyggjunum uttan í: Koltri, Stóru Dímun og Lítlu Dímun.

Haran trívist tó best á teimum størru oyggjunum, meðan minni er til á teimum smærru oyggjunum. Niðanfyri er ein samandráttur av tí, sum vit vita um haruskjóting á teimum smærru oyggjunum

**Fugloy**: Í 2014 vórðu 17 harur skotnar í Fugloynni á 4 túrum. Í 2013 varð eingin hara skotin í Fugloy; hvørki í Hattarvík ella á Kirkju.

**Svínoy**: Í 2014 skutu teir 52 harur á 11 túrum í Svínoy. Í 2013 var talið 11 harur skotnar á 3 túrum, og í 2012, 7 harur á 2 túrum.

**Mykines**: Eingin skeyt harur í Mykinesi í 2014, hóast hara livir í oynni, og tað gjørdu teir heldur ikki í 2013.

**Hestur**: Í Hesti skutu teir 22 harur á 2 túrum í 2014. Í 2012 var fyrstu ferð, at teir skutu harur í Hesti. Teir vóru 3 túrar, og fingu tilsamans 42 harur. Í 2013 havi eg eisini skrásett 3 túrar, sum góvu 44 harur tilsamans.

Haran, sum í dag er í Hesti, er nýliga slept upp: Árini 2009-2012 gav Karlot Hergeirsson hestmonnum 5 ella 6 harur, sum vórðu fangaðar í Nólsoy, og umleið ár 2000 var ein hara slept út í Hesti, sum Øssur Andreassen, hevði fanga í "Prestahaganum, Fremragonga" í Kvívík.

**Skúgvoy:** Í 2014 vóru 37 harur skotnar á 4 túrum í Skúgvoy. Í 2013 skrásetti eg 22 harur, sum vórðu skotnar á 4 túrum. Í 2012 var talið 20 harur á 2 túrum.

**Stóra Dímun:** Hara finst ikki á Stóru Dímun, men royndir eru tó gjørdar at seta haru út á oynna. Marnar Gaard hevur greitt mær frá, at hann og Bjarni Sjúrðagarð 28. desember 1994 fangaðu tríggjar livandi harur í hagapartinum, "Fyri Framman, Fremripartur" í Streymnesi, har teir báðir vóru og skutu. Hesar tríggjar harurnar vórðu sleptar á Stóru Dímun, men einki kom undan.

### 8.1 Haruskjóting á eystara armi á Skálafjørðinum

Vanliga er ikki stórur áhugi at skjóta harur á eystara armi á Skálafjørðinum. 2014 var fyrstu árið, at eg havi skrásetta ein harutúr fyri bygdina Toftir.

Fyri árið 2014, havi eg skrásett, at tilsamans 21 harur vóru skotnar á 11 túrum í hagunum, sum hoyra til bygdina Toftir.

22. desember var Magnus Pauli Poulsen ein túr í Húshagi á Toftum. Hann fekk tríggjar harur hendan dagin. Tá Magnus Pauli Poulsen verður spurdur, um hann veit um aðrir eisini hava skotið har, svarar hann:

> "*Eg veit at onkur plagar at skjóta sunnanfyri har eg skjóti* (tað er Húshagi)*, men tað mann ikki verða tað nógva - giti einar 2-3 ferðir um árið. Eg og ein vinmaður plagdu at vera fyri nøkrum árum síðani - vit vóru einar 5-6 túrar um árið og plagdu at skjóta einar 2-4 harur - passaligt til nýggjársdøgurðan - men vit sóu tó altíð 1-2 harur hvørja fer vit vóru ein túr. Seinastu árini hevur verið lítið at sæð, og eisini hava harutúrarnir verið fáir. Her er nógvur lyngur, heyggjar og gravar o.s.fr., so tað er ringt at síggja haru. Fyri tað kunnu tað líggja 100 harur og goyma seg í lendinum - ofta leypa tær ikki fyrr enn mann gongur seg fram á tær. Hendan túrin vit vóru leygardagin sóu vit eina aðra haru, men hon var uttanfyri byrsumál.*"

Heldur ikki í hinum bygdunum við eystara armin á Skálafjørðinum vórðu tær nógvu harurnar skotnar í 2014: Í Æðuvík skutu teir 10 harur á 5 túrum, í Rituvík 1 haru á einum túri, á Glyvrum var eingin hara skotin, í Lamba skutu teir 18 harur á 4 túrum og í Søldarfirði, 22 harur á 4 túrum.

## 9. Nøkur haruhagtøl til umhugsunar

Í talvu 9.1 eru nøkur hagtøl um haruveiðuna í Føroyum; virðið av veiðuni, bæði í tali av máltíðum og sum krónuvirðið á kjøtinum. Eisini sæst, hvørjar útreiðslurnar eru, bæði í krónum og sum byrðan fyri umhvørvið. Í talvuni sæst, at samlaða virðið á teimum 9.400 skotnu harunum var ein sløk millión, og at 940 kg av blýggjhøglum og 235 kg av plastikki fóru út í náttúruna. Sambært Abrahami Mikladal, so innflyta vit meir enn 150.000 patrónir árliga (Tøl frá Hagstovuni), og tað svarar til góð 6 tons av blýggi.

**Talva 9.1:** *Nøkur haruhagtøl fyri 2014.*

| | |
|---|---|
| **Haran** | |
| Tal av skotnum harum | 9.400 |
| Vekt á harukjøti (kg) | 7.520 |
| Tal av máltíðum | 37.600 |
| Samlað virði (kr.) | 940.000 |
| **Patrónir** | |
| Tal av patrónum | 23.500 |
| Kostnaður av patrónum (kr.) | 141.000 |
| Vekt av høglum (kg) | 940 |
| Vekt av plastikki (kg) | 235 |
| Fylla plastikk ($m^3$) | 4 |

Útrokningarnar byggja á hesar fortreytir: 9.400 skotnar harur, sum hvør hevur 800 gr. av kjøti. Eitt fólk etur 200 gr av kjøti til ein døgurða. Prísur á harukjøti 125 kr/kg. Í miðal verða brúktar 2,5 patrónir pr. haru. Í hvørjari patrón eru 40 gr av høglum og 10 gr av plastikki við massafylluni 15 $cm^3$. Hvør patrónin kostar 6 kr.

## 10. Verður ov nógv skotið?

Síðani eg í 2012 fór undir at skráseta, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum, eru tað summi, sum hava sagt við meg, at kapping nú er komin í haruskjótingina, og at hetta fer at ganga út yvir tann Føroyska harustovnin. Eg haldi tó ikki, at hetta er vorðið ein trupulleiki. Høvuðsmunurin er, at fyrr vistu vit ikki, hvussu nógvar harur vórðu skotnar í Føroyum, men tað vita vit nú.

Vit kunna í dag skjóta harur í Føroyum einar 50 dagar um árið; frá 2. november til 31. desember. Nógvar av teimum harunum, sum ikki verða skotnar, í hesum tíðarskeiðinum, doyggja tó helst allíkavæl av sær sjálvum, í januar, februar og mars mánað; antin av svongd ella av kulda. Hetta valdast tó altíð, hvussu vetrarveðrið skikkar sær. Eisini verða fleiri harur yvirkoyrdar av bilum, tí harurnar koma oman úr fjøllunum, at leita sær føði. Hetta er eisini galdandi í 2015, tí í ár havi eg sæð nógvar deyðar harur fram við vegnum.

At nógvar harur eisini doyggja av svongd ella kulda vetrarmánaðirnar, vita vit. Eli Jensen av Hellunum segði mær, at hann fyrr plagdi at skjóta harur í Skarðhaga á Hellunum. Tað eina árið, hetta hevur verið miðskeiðis í 1980'unum, segði Eli mær, at hann varð átalaður av einum øðrum harumanni, tí hann skuldi hava skotið ov nógvar harur, og hann tí skuldi hava oytt harustovnin í haganum. Eli hevði tað árið skotið tilsamans 50 harur í Skarðhaga. Eli segði mær, at eftir hesa ábreiðsluna fór hann at telja, hvussu nógvar harur hann fann deyðar í bønum og rundan um húsini.

Í tíðarskeiðinum frá fyrst í januar til hálvan mars mánað taldi hann tað árið 30 harur, sum lógu og sløddust deyðar rundan um húsin. Talið av "sjálvdeyðum" harum var sostatt 63% av tí, sum Eli Jensen hevði skotið í Skarðhaga tað árið.

Hetta man ikki vera nakað eindømi, tí ringar kavavetrar eru tað helst nógvar av teimum harunum, sum ikki verða skotnar av harumonnum í november og desember mánað, sum ikki yvirliva veturin.

### 10.1 Eitt lítið roknistykki til umhugsunar

Haran er før fyri at nøra seg rættuliga skjótt. Føroyska haran leggur tríggjar ferðir um árið: Fyrsta løgan er í februar-mars, onnur í mai-juni og triðja løgan er í august-september. Tveir til tríggir ungar eru í hvørjari løgu.

Norska haran leggur, eins og okkara, eisini 2 til 3 ferðir um árið. Um norsku haruna verður sagt: "*Antall unger i kullet kan variere adskilig, men i gennemsnitt føder 2-5 unger pr. kul*", og víðari verður sagt "*Det synes som om totalt antal unger pr. hun hvert år er 7-8 uansett om den har to eller flere kull*". Vit ganga tí út frá, at føroyska haran eisini fær einar 7 ungar um árið.

Lat okkum taka eitt lítið roknistykkið, sum vísir hvussu skjótt haran kann nørast:

- Tá veiðitíðin byrjar, eru 20.000 harur í Føroyum.
- Helvtin verður skotið. Fyrsta januar eru tí 10.000 harur eftir: 5.000 frensar og 5.000 løgur.
- Hvør av hesum løgunum leggur 7 ungar; 35.000 ungar tilsaman.
- Tær 10.000 harurnar, sum vóru eftir 1. januar, eru nú vorðnar til 45.000 harur.

Í roknistykkinum ganga vit út frá, at allar tær vaksnu harurnar, sum vóru til 1. januar, yvirliva, og at allir teir løgdu ungarnir eisini yvirliva.

Hetta er sjálvsagt ikki rætt, tí fleiri av teimum gomlu harunum doyggja gjøgnum veturin, sum víst er á omanfyri, og fáa tí heldur ikki ungar. Allir ungarnir, sum verða lagdir, yvirliva heldur ikki. Hetta ger, at vit tí ikki hava 45.000 harur 2. november, men bara einar 20.000. Hinar 25.000 harurnar, bæði vaksnar og ungar, doyggja í tíðarskeiðinum frá januar til november.

Men hvussu kann eg vita, at einans 20.000 harur eru eftir tá harutíðin byrjar?
Tað kann eg siga, tí sæð yvir fleiri ár, er harustovnurin konstantur; Eftir míni varisligu meting, einar 20.000 harur tilsamans.

## 10.2 Hvussu kann veiðan avmarkast?

Fyri at hava eina skilagóðar stovnsrøkt, eru neyðugt at lúka tvær høvuðsfortreytir:

- Tann fyrra er, at vit vita, hvussu nógv verður tikið burtur úr stovninum.
- Hin er, at vit vita, hvussu stórur stovnurin er.

Við støði í kanningunum, sum eg havi gjørt í 2012, 2013 og í 2014, vita vit nú, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum á hvørjum ári. Vit hava eisini eina hóming av, hvussu stórur tann føroyski harustovnurin er.

Um hendan kanningin eisini fer at verða gjørd í framtíðini, ber til at fylgja við gongdini um, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum. Um royndin blívur ov stór, fer hetta at síggjast aftur í talinum av harum, sum verða skotnar um árið, tí talið fer tá at minka. Um samlaða talið av skotnum harum minkar fleiri ár á rað, er hetta tekin um, at veiðan hevur verið ov stór, og so er neyðugt at avmarka veiðuna. Hetta kann gerast upp á fleiri mátar, t.d.:

- Stytta um veiðitíðina.
- Seta hámark á, hvussu nógvar byrsur eru loyvdar í hvørjum haga hvønn túrin.
- Seta hámark fyri, hvussu nógvir túrar kunnu verða gjørdir í einum haga um árið.

Til ber sjálvsagt eisini, at hava eina samantvinning av hesum trimum avmarkingunum.

## 10.3 Summastaðni eru avmarkingar

Tað hevur fyrr verið vanligt í Føroyum, at mark er sett fyri, hvussu nógvar byrsur eru loyvdar í einum haga, men eg havi varhugan av, at hendan avmarkingin ikki verður so nógv nýtt longur.

Hetta verður tó enn praktisera summastaðni. Ein harumaður í Hvalvík hevur sagt mær, At í Húsadalshaga og í Toftadalshaga er loyvt at hava í mesta lagi tríggjar byrsur í haganum í senn.

Á Facebook- bólkinum “Haruskjóting í Føroyum” var orðskifti um, at veiðan í hagapartinum “Norðurnesi” í Vestmanna kanska var vorðin dekan ov stór. Ein maður skrivar:

> “*Hvar er allur moralur blivin av. Frá tíð eg minnist, og langt áðrenn tað, var tað ikki loyvt at hava meir enn 5 ella 6 byrsur í Norðurnesi í senn. Tá ið Arni á Rógvu seldi hagarnar, legði hann ofta aftrat, hvussu nógvar byrsur máttu verða fyri hvønn ávísa haga. Tað sær tíverri út, sum at hettar er nakað, sum er fari í søguna. Man hoyrir tíverri oftari og oftari um, at eini 10- 12 menn fara í teir minstu hagarnar i bygdini at skjóta haru. Eg veit ikki um nakar deilur mína meining, sum er at eg haldi hettar verða ósportligt.*”

Og ein annar svarar aftur

> “*Eg eri púra einingur við tær, minnist tá tað bleiv lagt mark á hvussu nógvar byrsur man kundi hava í hvørjum haga. Tað var ikki 10 í Nesinum*”

Í Trongisvági regulera teir bæði byrsur og dagatalið. Ein harumaður úr Trongisvági hevur sagt mær, at har eru avmarkingar settar á veiðuna, so talið av byrsum er tað sama sum markatalið fyri hagan. Tað vil siga, at um hagin er 4 merkur, so hava bert 4 byrsur loyvi at skjóta haru, t.v.s. max 4 einkulttúrar ella 4 byrsur ein einstakan dag.

Fyri at taka saman um tað, sum eg havi skrivað omanfyri, so haldi eg ikki, at tað í løtuni verður skotið ov nógv av haru í Føroyum. Um tað í framtíðini fer at vísa seg, at veiðan er ov stór, so eru fleiri møguleikar fyri at seta tiltøk í verk, sum kunna minka um veiðuna.

## 11. Tíðarskeið, har loyvt er at skjóta haru

í dag er loyvt at skjóta haru í Føroyum í tíðarskeiðinum 2. november til 31. desember. Triðja november 2014 hevði Áki Bertholsen eina forvitnisliga grein í Sosialinum um haruveiðu. Greinin byggir á ein fyrilestur, sum eg hevði havt um hetta evnið og á eina telefonsamrøðu, sum Áki Bertholsen hevði við meg aftaná fyrilesturin.

Tíðan verri hevur ein keðilig villa sníkt seg inn í greinina, har eg verið siteraður fyri at siga:

> "....*Lívfrøðingurin heldur, at tað hevði verið forsvarligt at skotið harur í januar, februar og kanska í mars eisini*".

Men hetta haldi eg ikki. Eg haldi, at veiðitíðin, har loyvt er at skjóta haru, skal vera verandi, sum hon er nú, t.v.s. frá 2. november til 31. desember, sum er einar 55 dagar um árið.

### 11.1 Veiðitíðin verið skiftandi gjøgnum tíðirnar

Haran kom til Føroyar í 1855. Síðani tá hevur tíðarskeiðið, har loyvt hevur verið at skjóta haru, verið eitt sindur skiftandi (Mynd 11.1). Fyrsta lógarásetingin um haruskjóting í Føroyum er frá 1881. Tá var loyvt at skjóta haru í tíðarskeiðinum frá 1. oktober til 14. februar; tilsamans 136 dagar um árið. Í 1928 varð tíðarskeiðið stytt til 91 dagar; frá 1. november til 31 januar. Í 1945 varð lógin aftur broytt, so tú kundi skjóta 60 dagar um árið, og hetta er tað, sum hevur verið galdandi síðani, undantikið árið 1969, tá skjótast kundi 30 dagar um árið; frá 3. november til 3. desember, og í 1970, tá skjótast kundi til 20. desember. Í 1972 varð tíðarskeiðið tó aftur longt til tað, sum vit kenna í dag (Mynd 11.1).




**Mynd 11.1:** *Tíðarskeiðið, har loyvt hevur verið at skjóta harur í Føroyum árini 1881 til í dag.*

## 11. 2 Fyrr skutu teir eisini kvidnar harur

Eftir at eg í bløðunum hevði gjørt vart við mistakið hjá blaðmanninum á Sosialinum, ringdi ein eldri harumaður, um 60 ára aldur, til mín. Hann segði mær, at hann, í sínum ungu døgum, hevði skotið harur saman við eldri monnum, sum eisini høvdu skotið, tá tað var loyvi at skjóta haru til 31. januar. Hetta hevur sostatt verið áðrenn 1945.

Hesir menn høvdu sagt honum, at fleiri av harunum, sum tá vórðu skotnar í januar mánað, høvdu ungar liggjandi inni í búkinum, og at hetta skuldi vera grundi til, at veiðitíðin varð stytt til tað, sum vit kenna í dag, t.v.s. til 31. desember.

Hetta er væl hugsandi, tí haran leggur sína fyrstu løgu í februar- mars mánað. Haran gongur kviðin í einar 7 vikur, og tí skuldu allar tær kvidnu harurnar havt fostur inni í sær í januar mánað. Tað er tí uttan iva rætt, sum teir gomlu harumenninir søgdu, sum høvdu skotið harur áðrenn 1945.

Hóast harutíðin nú endar 31. desember, so ber tó framvegis til at fáa harur, sum hava fostur inni í sær. Í november 2013 fletti ein harumaður í Norðoyggjum eina haru, sum hevði ein unga í búkinum. Tað sama skrivar ein suðuroyingur á Facebook síðuni ‘Haruskjóting í Føroyum’: ”*Fann einaferð ungar í eini haru, sum var skotin í desember mánaði.*”
17. januar 2014 skrivar ein annar maður á Facebook síðuni: “*Ein hara, sum eg fletti 12. des í 2013 hevði tríggjar ungar í búkinum. Teir vóru fult útvikladir og kundu tað sama verið lagdir innan stutta tíð. Eg rokni tó við, at teir hava verið deyðir í búkinum eina tíð.*”

## 11.3 Kanska tolir haran størri veiðitrýst

Tað kann vera, at føroyski harustovnurin hevði tolað, at veiðitíðin varð longd eitt sindur, kanska einar tvær vikur, uttan hetta hevði skatt stovnin. Men trupulleikin í dag er, at vit vita so lítið um føroysku haruna. Eingin almenn skráseting hevur verið av, hvussu nógv hara verður skotin í Føroyum. Teir, ið skjóta haru, hava ikki skyldu at boða frá, hvussu nógv teir hava fingið, hvussu ofta teir hava skotið ella hvussu nógvir mans hava verið við. Tí vita vit heldur ikki, hvussu nógvar harur árliga hava verið skotnar í Føroyum gjøgnum tíðina, ella hvussu stór royndin hevur verið. Tað hevur tí heldur ikki verið møguligt, at gjørt eina nágreiniliga kanning av, hvussu stórur føroyski harustovnurin er.

Øll hendan vitanin um føroysku haruna er neyðug, um vit ætla at leingja um veiðitíðina. So leingi sum vit ikki hava hesa vitanina, haldi eg, at veiðitíðin skal vera verandi, sum hon er nú, t.v.s. frá 2. november til 31. desember.

## 12. Friðing av haru

Sambært løgtingslóg um haruveiðu, sum er frá 1988, so hevur landsstýrið heimild at friða haruna. Sagt verður soleiðis “*Innanfyri tilskilað umráði (oyggj ella part av henni) kann haran friðast eftir avgerð landsstýrisins fyri eitt ella tvey ár í senn eftir umsókn frá sóknarstýri og eftir at øll sóknarstýri í oynni hava givið ummæli í málinum*”.

Tað er ikki eydnast mær at fáa nakað yvirlit yvir, nær og hvar haran hevur verið friðað í Føroyum, men í 1934 legði løgtingið fram uppskot um at friða haruna í Streymoynni annað hvørt ár í 10 ár. Sóknarstýrini skuldu ummæla uppskotið. Uppskotið varð kortini broytt í løgtinginum, soleiðis at friðingin bert varð galdandi í 1935. (Kelda: “Vestmanna søga”, bind 2 s. 423)

Annfinn Reinert, sum er slektaður úr Norðradali, hevur sagt mær, at í 1969 varð haran bara skotin í november mánað (í desember mánað bleiv hon friðað).

## 13. Eldri veiðuhagtøl

Fleiri staðni hevur tað verið vanligt, at harumenn skriva niður, hvussu nógvar harur verða skotnar, antin á hvørjum túri, ella samlað fyri alla veiðitíðina. Tað eru uttan iva fleiri, sum liggja inni við tílíkum tølum. Tað hevði tí glett meg almikið, um eg kundi fingið fatur á hesum tølunum. Hetta kann gerast við at senda mær kopi av tølunum, antin úr dagbókini, lummabókini ella listanum, og senda mær tey við postinum á:

Eyðfinn Magnussen
Íslandsvegur 4
Fo-100 Tórshavn.

Ella, um tit hava skrivað tølini inn í eitt rokniark ella onkra aðra elektroniska skipan, so at senda mær tølini við telduposti á teldupostadressuna:

Eydfinnm@setur.fo

Í frágreiðingin "*Haruveiðan í Føroyum 2012*", var tað eydnast mær, at fáa fatur á nøkrum tíðarserium, sum vístu, hvussu nógvar harur vóru skotnar í eitt longri áramál í ávísum hagapørtum, bygd ella oyggj. Talan var um:

- Fuglafjørð
- Sundshaga, Uttara part
- Klappjakt í Trongisvági
- Nólsoy
- Vágar
- Sandavág

Hesi tølini kunna lesast í frágreiðingin "*Haruveiðan í Føroyum 2012*", sum liggur á internetinum:
http://setur.fo/uploads/tx_userpubrep/NVDrit2013_02_UrslitFraHaruskjoting2012.pdf

Í frágreiðingini "*Haruveiðan í Føroyum 2013*", eru søgulig tøl um haruveiðuna í fýra øðrum hagapørtum:

- Leynahagi, Uttan fyri Húsini, Leynar
- Ytri Suðurtriðingur, Sørvágur
- Sunnari Suðurtriðingur, Sørvágur
- Sjóvarhagi, Niðari partur, Kollafjørður

Hesi tølini kunna lesast á:
http://setur.fo/uploads/tx_userpubrep/NVDrit2014_02_HaruveidanIFoeroyum2013.pdf

Nú er tað aftur eydnast mær at fáa fatur á fleiri slíkum tølum. Talan er um seks hagapartar:

- Skálatoftahagi, Skálatoftir
- Presthagin (Heimi í Haga), Norðradalur
- Fyri Framman, Fremripartur Streymnes
- Byrgið, Haldarsvík
- Dalkin, Elduvík
- Prestfjall, Sunnaripartur, Hvalba

## 13.1 Skálatoftahagi, Skálatoftir

Mynd 13.1 vísir samlaða talið av harum, sum eru skotnar í 'Skálatoftahaga', sum hoyrir til bygdina Skálatoftir á Borðoynni. Hesi 43 árini hevur veiðan verið millum uml. 5 (1980) og uml. 270 harur (1996). Miðaltalið av harum, sum hava verið skotnar í Skálatoftahaga hevur verið einar 125 harur um árið.




***Mynd 13.1:*** *Talið av harum, sum eru skotnar í haganum 'Skálatoftahagi' á Skálatoftum á Borðoynni, árini 1970-2013. Myndina hevur Andras Samson gjørt).*

## 13.2 Presthagin (Heimi í Haga), Norðradalur

Mynd 13.2 vísir samlaða talið av harum, sum eru skotnar í 'Presthaga', eisini nevndur 'Heimi í Haga' í Norðradali árini 1976 til 2014. Hesi 39 árini hevur veiðan verið millum 24 (1979) og 127 harur (1976). Tilsamans hava teir skotið 2.871 harur hesi árini. Hetta gevur í miðal 73,6 harur um árið.




***Mynd 13.2:*** *Talið av harum, sum eru skotnar í haganum Presthagin', eisini nevndur 'Heimi í Haga' í Norðradali árini 1976-2014. Hesi 39 árini eru tilsamans 2.871 harur skotnar í haganum. Hetta gevur í miðal 73,6 harur um árið. (Myndin byggir á tøl, sum eg havi fingið frá Annfinni Reinert).*

### 13.3 Fyri Framman, Fremripartur, Streymnes

Mynd 13.3 vísir samlaða talið av harum, sum eru skotnar ‘Fyri Framman, Fremripartur’ í Streymnesi, árini 1980 til og við 1994, og so aftur 2009 til 2014. Hesi 21 árini, sum tøl eru fyri, hevur veiðan verið millum 21 (1989) og 87 harur (1986). Tilsamans hava teir skotið 943 harur hesi árini, sum í miðal gevur 44,9 harur um árið.




***Mynd 13.3:*** *Talið av harum, sum eru skotnar í haganum ‘Fyri Framman, Fremripartur’ í Streymnesi árini 1980-1994 og 2009-214. Hesi 21 árini eru tilsamans 943 harur skotnar í haganum. Hetta gevur í miðal 44,9 harur um árið. (Myndin byggir á tøl, sum eg havi fingið frá Marnar Gaard).*

### 13.4 Byrgið, Haldarsvík

Mynd 13.4 vísir samlaðu haruveiðuna í ‘Byrginum’ í Haldórsvík árini 2001 til 2014. Veiðan hevur hesi 14 árini verið millum 3 (2014) og 66 harur (2003). Hesi árini hava teir skotið tilsamans 557 harur. Í miðal 40,5 harur um árið.




***Mynd 13.4:*** *Talið av harum, sum eru skotnar í haganum ‘Byrgið’ í Haldórsvík árini 2001 til 2014. Hesi 14 árini eru tilsamans 567 harur skotnar í haganum. Hetta gevur í miðal 40,5 harur um árið. (Myndin byggir á tøl, sum eg havi fingið frá Agnar Dahl og Hans Dávid Dam).*

### 13.5 Dalkin, Elduvík

Mynd 13.5 vísir samlaðu haruveiðuna í hagapartinum 'Dalkin' í Elduvík ár 2000 og so aftur árini 2007 til 2014. Veiðan hevur hesi 9 árini verið millum 19 (2014) og 69 harur (2010). Hesi árini hava teir skotið tilsamans 424 harur, sum í miðal gevur 47,1 harur um árið.




***Mynd 13.5:*** *Talið av harum, sum eru skotnar í haganum 'Dalkin' í Elduvík ár 2000 og so aftur 2007-2014. Hesi 9 árini eru tilsamans 424 harur skotnar í haganum. Hetta gevur í miðal 47,1 harur um árið. (Myndin byggir á tøl, sum eg havi fingið frá Hans Dávid Dam).*

### 13.6 Prestfjall, Sunnaripartur, Hvalba

Mynd 13.6 vísir samlaða talið av harum, sum eru skotnar í hagapartinum 'Prestfjall, Sunnaripartur', í Hvalba árini 2001 til 2014. Tey 11 árini, sum tøl eru fyri, hevur samlaða veiðan verið millum 3 og 32 harur. Tilsamans hava teir skotið 179 harur hesi árini. Hetta gevur í miðal 16,3 harur um árið.




***Mynd 13.6:*** *Talið av harum, sum eru skotnar í haganum 'Prestfjall, Sunnaripartur í Hvalba, ymisk ár frá 2001 til 2014. Hesi 11 árini eru tilsamans 179 harur skotnar í haganum. Hetta gevur í miðal 16,3 harur um ári (Myndin byggir á tøl, sum eg havi fingið frá Hanus Holm Stórhamar).*

# 14. Haruskjóting í Vestmanna

Vestmanna man vera tann bygdin í Føroyum, har mest verður gingið upp í haruskjóting. Í Vestmanna eru 9 hagapartar, sum tilsamans eru 56 merkur (Mynd 14.1 og Talva 14.1). Til haruskjóting verða tveir av hagapørtunum seldir í tveimum. Umframt hesar nýggju hagapartarnar, eru eisini Kvívíksmerkur, sum eru 3 merkur og 12 gyllin, men hesin hagaparturin er skrásettur at hoyra til Kvívíkar. Sostatt eru 12 haruhagar í Vestmanna (Mynd 14.1 og 14.2).




***Mynd 14.1:*** *Í Vestmanna eru 9 hagapartar, sum tilsamans eru 56 merkur. Í tveimum av høgunum, verða rættindini at skjóta harur seld í tveimum: Neshagi verður seldur sum Nesið (eisini nevndur Norðnes) og Brekkurnar. Fjalshagi verður seldur sum Fjallið og Reynið. Umframt hesar nýggju hagapartarnar, eru eisini Kvívíksmerkur, sum eru 3 merkur og 12 gyllin, men hesin hagaparturin er skrásettur at hoyra til Kvívíkar. Sostatt eru 12 haruhagar í Vestmanna. (Mynd: Helgi Jacobsen, Vestmanna søga).*

| **Hagapartur** | **Markatal (merk - gyll.)** | **Vídd (km$^2$)** | **Áseyðatal** |
|---|---|---|---|
| Dalhagi, Eystaripartur | 05 – 00 | 6,91 | ? |
| Dalhagi, Heimaripartur | 04 – 00 | 5,06 | ? |
| Heimi í Haga á Bjørgum, Eystari | 03 – 10 | 3,02 | 118 |
| Heimi í Haga á Bjørgum, Vestari | 04 – 10 | 2,48 | 108 |
| Úti í Haga á Bjørgum | 05 – 00 | 4,18 | 222 |
| Fjalshagi | 09 – 00 | 9,54 | 360 |
| Heygahagi, Fremrahelvt | 09 – 04 | 6,42 | 260 |
| Heygahagi, Innarahelvt | 09 – 04 | 7,73 | 220 |
| Neshagi | 06 – 04 | 4,42 | 230 |
| **Tilsamans** | **56 merkur** | **74,76** | |

***Talva 14. 1****: Hagapartarnir, sum hoyra til Vestmanna. Fyri hvønn haga er víst støddin á haganum, uppgivið sum merkur og gyllin, víddin á haganum og áseyðatalið (Kelda: Hagar og seyðamark og heimasíðan: www.heimabeiti.fo, Kári Thorsteinsson, Umhvørvisstovan).*

Vestmanna er eisini tann bygdin í Føroyum, har flestar harur verða skotnar. Í 2014 skutu teir tilsamans 1.220 harur í Vestmanna, sum svarar til 13% av øllum harunum, sum vóru skotnar í Føroyum í 2014 (sí partin “4.3 Bygd” aðrastaðni í hesi frágreiðingini). Í 2013 vórðu 761 harur skotnar í Vestmanna.

Av teimum 7 høgunum, har flestar harur vórðu skotnar í Føroyum í 2014, vóru fýra teirra í Vestmanna (Talva 4.1). Útihagin á Bjørgum var besti haruhagin i Føroyum, bæði í 2014 og í 2013. Í 2014 skutu teir 214 harur í hesum haganum á tilsamans 11 túrum, í 2013 fingu teir 158 harur á 9 túrum.

Av haruhøgunum í Vestmanna var Neshagi næstbestur í 2014 við 202 harum á 14 túrum, síðani Dalhagi, Eystaripartur, við 156 harum á 4 túrum (Mynd 14.2).




***Mynd 14.2:*** *Tal av harum, sum vórðu skotnar í 2014 og 2013 í teimum 12 haruhøgunum, sum hoyra til bygdina Vestmanna.*

### 13.1 Sølan av haruhøgunum

Í Vestmanna verða haruhagarnir seldir á uppboðssølu, sum verður hildin á Rógvugarði seinasta sunnudag í oktober mánað. Soleiðis hevur tað verið síðani 1942, tá Arni á Rógvu og aðrir tóku stig til uppboðssøluna.

Øll hesi árini hevur uppboðssølan verið fyriskipað av Rógvu-familjuni. Í nógv ár var tað Arni á Rógvu, sum hevði uppboðssøluna. Tá hann gjørdist gamal og ov blindur at selja, tók sonurin, Regin á Rógvu yvir og síðani 2006 hevur dóttir Regin, Eydna á Rógvu Simonsen selt haruhagarnar. Allir hagarnir hava tó ikki verið við í hesi skipanini. Haruhagarnir á Heygum: ‘Heygahagi, Fremrahelvt’ og ‘Heygahagi, Innarahelvt’ hava verið seldir fyri seg, og onkuntíð eru hagarnir á Dølum seldir longur úti í býlinginum á Rógvu.

Øll hesi árini eru prísirnir, sum hagarnir eru seldir fyri og hvør keyparin er, skrivað í eina svarta lummabók, sum er í varðveitslu hjá Rógvu-familjuni. Tíðan verri er bókin fyri árini 1942 til 1965 blivin burtur, men bókin fyri árini frá 1966 og frameftir verður framvegis brúkt (Mynd 14.3). Eydna á Rógvu Simonsen hevur verið so beinasom at læna mær hesa bókina.



***Mynd 14.3**: Síðani 1942 hava haruhagarnir í Vestmanna verið seldir á uppboðssølu í Rógvugarði tann seinasta sunnudag í novembermánað. Prísirnir á haruhøgunum og hvør ið keypt hevur verður skrivað í hesa bókina.*

### 13.2 Prísir á haruhøgunum

Prísirnir á haruhøgunum í Vestmanna kunnu broytast nógv frá einum ári til annað. Góðar tíðir hava við sær, at kappingin millum hagarnar verður størri. Onkuntíð koma eisini avbygdarfólk til Vestmanna at bjóða, og so økist kappingin. Í 1993 vórðu hagarnir seldir fyri tilsamans 29.600 kr., men í 2005 fóru teir fyri 145.000 kr., men fór so niður aftur í 65.600 kr. í 2008 (Mynd 14.4). Útihagin á Bjørgum hevur mangan verið tann dýrasti. Í 1988 varð hann seldur fyri 17.500 kr. Ógvusligast vóru prísirnir í 2005, tá harumenn, við einum bankastjóra úr Havn, keyptu tveir haruhagar fyri tilsamans 58.000 kr.; Fjallið fyri 32.000 kr, og Útihagan á Bjørgum fyri 26.000 kr. (Mynd 14.5).




***Mynd 14.4:** Samlaði prísurin á 8 haruhøgum í Vestmanna, sum eru seldir á uppboðssølu í Rógvugarði árini 1966 til 2008.*




***Mynd 14.5:*** *Prísir á haruhøgum í Vestmanna, sum eru seldir á uppboðssølu í Rógvugarði árini 1966 til 2014*

## 15. Haruskjóting í Norra

Eg skal her til stuttleikar samanbera føroysku haruveiðuna við talið av harum, sum verða skotnar í Norra (Talva 15.1).

Í 2012 og í 2013 skutu norðmenn tilsamans einar 14.000 harur. Hóast Norra í vídd er 275 ferðir so stórt sum Føroyar, so var haruveiðan í Norra bara 50% størri enn okkara, og hóast veiðitíðin í Norra er 3 ferðir so long sum okkara (frá 10. september til 28. februar), so var veiðan fyri hvønn dag í Norra bara helvtin av veiðuni í Føroyum (82 mótvegis 159)

Jon Barikmo, er "fagdirektør" á "Seksjon for miljøovervåking og kartlegging" á norska Miljø Direktoratinum. Um norsku haruveiðuna sigur hann:

> "*Hareavskytingen i Norge har gått sterkt tilbake de seinere åra. På 1990 tallet ble det skutt rundt 100 000 harer pr. år. For jaktåret 2012 – 13 ble det skutt 14 000 harer.*"

Hví soleiðis er, veit hann ikki.

| | Skotnar harur (tal) | Areal (km2) | Skotnar harur per areal (tal/km$^2$) | Veiðitíðin | | | Veiða pr. dag (Tala/dag) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | Byrjan | Endi | Tal av døgum | |
| Føroyar | 9.400 | 1.400 | 6,71 | 2. nov. | 31. des. | 59 | 159,3 |
| Norra | 14.000 | 385.252 | 0,04 | 10. sep. | 28. feb. | 171 | 81,9 |
| Forhold (Norra/Fø.) | 1,5 | 275 | 185 | | | 2,9 | 0,5 |

***Talva 15.1**: Føroyska haruveiðan samanborið við veiðuna í Norra í 2012 og 2013.*



*Myndir frá haruveiðu í Norra, sum Jon Barikmo hevur sent mær. Í Norra er vanligt at hava hund við á haruveiðu.*

## 16. Kaninir í Føroyum

í harutíðini í 2013 fekk eg at vita um tvær ella tríggjar kaninir, sum vórðu skotnar í høgunum í Suðurstreymoy. Eisini aðrastaðni í Føroyum hava fólk sæð kaninir í haganum. 19. juni 2014 sóu fólk eina a kanin í haganum "Fjalli" á Strondum (Mynd 16.1)

Talan er uttan iva um kaninir, sum fólk hava havt sum kelidýr, men sum so eru slopnar leysum, antin av óvart, ella tí, at eigarin ikki tímdi at hava tær longur. Kaninirnar eru so farnar út í hagan, har tær hava búleikast. So leingi talan bert er um eina einstaka kanin, er eingin trupulleiki, tí fyrr ella seinri doyr hon; antin av sær sjálvum, ella hon verður skotin av harumonnum. Um fleiri kaninir eru saman í haganum, er øðrvísi. Hesar kunnu tá kanska fáa ungar, og eftir stuttari tí, fáa vit ein stovn av kaninum í haganum.



***Mynd 16.1:*** *19. juni 2014 sóu Petur Holm Stórhamar og onnur, sum gingu í haganum, hesa kaninina renna undir "Fjalli" á Strondum. Tey ivaðust, um talan var um eina kanin ella ein villfrens, sum gekk í haganum, men eftir at myndin hevði verið umrødd á Facebook-síðuni 'Haruskjóting í Føroyum' var eingin ivi um, at her er talan um eina kanin. (Mynd: Petur Holm Stórhamar)*

### 16.1 Kaninirnar hjá Pedda í Æðuvík

10. mars 2014 var sending í Útvarpinum "Við Tórði á túri í Æðuvík". Í sendingini greiðir Pedda Davidsen frá, tá hagin omanfyri Æðuvík var fullur av kaninum, tí ein kanin hevði lagt í haganum. Sendingin kann hoyrast á hesi leinkjuni: https://www.facebook.com/download/253448904860909/KaninurIAeduvik.wma

Í sendingini greiðir Pedda frá, at hann hevði fingið eitt kaninpar úr Søldarfirði. Hann hevði kaninirnar heima, har tær fyri tað mesta gingu leysar. Kaninirnar fingu ungar, men teir flestu ungarnir vórðu tiknir av kettum. Men so eitt árið hevði kaninin lagt uppi í haganum, og teir ungarnir komu ongantíð aftur. Hesir ungarnir blivu styggir og formeraðu seg til fleiri hundrað kaninir, greiðir Pedda frá. Kaninirnar hildu til líka frá Nøvini, eystur um Nesið og heim gjøgnum Líðina. Tá kaninirnar komu, hvurvu harurnar í økinum, greiðir Pedda frá. Harumenninir dámdu hetta einki, sigur Pedda,

men har var einki at gera. Í staðin fyri at skjóta harur, skutu teir nú kaninir í Æðuvík. Petta sigur, at tað eina árið skeyt hann sjálvur einar 50 kaninir. Einaferð fekk hann tvær kaninir í einum skoti. Kaninirnar gróvu holur í haganum, men Pedda sigur, at av tí, at tað ikki er so nógv at grava í har í haganum, so gjørdu kaninirnar ikki stórvegis skaða á hagan.

Kaninirnar hjá Pedda vóru í haganum í Æðuvík í eini 10 ár, men tá stórkavi kom, veturin 1978/79 doyðu allar kaninirnar.

Hetta er søgan um, hvussu ein einstøk kanin gjørdist til fleiri hundrað, men tær hvurvu so líka brádliga aftur, sum tær vórðu komnar.

Í bókini “Heimur okkara – Alfrøði”, er eitt av evnunum, sum verða umrødd ‘Harur og kaninir’ (s. 98). Her verður millum annað sagt “*Villkaninin leggur minst 20 ungar um árið, og tí eru kaninir nógvastaðni vanligastu súgdýr*”. Kaninir hava eisini verið í haganum í Suðuroynni um ár 1900, bæði við Froðbiarnípuni og í Trongisvági. Í bókini “Heimur okkara – Alfrøði” verður sagt, “*Um aldaskiftið (t.e. 1900) løgdust tær út í Suðuroy og nørdust skjótt, men so fækkaðust tær aftur, og nú er eingin eftir*”

## 16.2 Náttúrugripasavnið ørkymlað um støðuna

Á Náttúrugripasavninum eru tey eitt sindur ørkymlað um støðuna, at kaninir leggjast í hagan. 2. desember 2014 kom Náttúrugripasavnið við hesum tíðindaskrivinum:

**Vandamiklar kaninir**

“*Tá menn vóru og skutu harur í Havnadali herfyri, var ein kanin ímillum harurnar. Hetta er ikki fyrsta kaninin, sum hevur reikað í einum føroyskum haga. Náttúrugripasavnið hevur frætt um aðrar kaninir uttangarðs í Streymoynni, Eysturoynni og Suðuroynni. Eisini hevur ein verið at sæð í lundalandi í Mykinesi.*

*Náttúrugripasavnið er sera ørkymlað av at hoyra um kaninir í føroysku náttúruni. Tær hoyra ikki heima her, og byrja tær at nørast, kann roknast við skaða á okkara djóra og plantulív.*

*Kanin kann nørast í føroysku náttúruni. Tað gjørdur tær í Froðbiarnípu og Trongisvági í 1800-talinum, men tíbetur hvurvu tær aftur.*

*Í Íslandi eru tær farnar at nørast í fleiri støðum, og har gera tær skaða bæði í náttúru og í gørðum. Tær verða roknaðar sum ein hóttan fyri lundastovnin í Vestmannaoyggjunum. Umframt at vera til skaða fyri lundalond í Skotlandi, hava kaninir eisini gjørt skaða á fornminni og elvt til skriðulop har. Í Avstralia eru tær nú heilt bannaðar, og roknað verður við, at tær gera skaðar fyri milliardir á hvørjum ári. Kaninir eru fitt kelidjór, men tá tær sleppa út í náttúruna, eru tær ikki kelidjór longur.*

*Ein kunngerð er í gildi, sum staðfestir, at einki djóraslag, ið ikki hoyrir heima í føroysku náttúruni, kann sleppast út. Hetta umfatar eisini tær kaninir, ið fólk hava, og sum ofta*

*reika leysar ímillum húsini. Eigarin brýtur lógina, tá ein kanin fer út í náttúruna – eisini um hon er rýmd úr búri – og sambært kunngerðini verður eigarin straffaður við bót.*

*Vill kanin minnir um haru, men hevur styttri oyru og styttri bakbein, og tær hava ikki somu myrku blettir á hala og oyru. Tó, tær kaninir, ið vit kunnu vænta at síggja her, líkjast ikki heilt teimum villu kaninunum. Støddin er misjøvn og tær hava ofta hangandi oyru og eru øðrvísi littar. Tey stuttu bakbeinini er helst besta eyðkennið. Náttúrugripasavnið frǽttir fegið frá fólki, ið hevur sæð kaninir uttangarðs.*"

## 17. Heimildir

Áki Bertholdsen O.F. (192): **Heimur okkara : alfrøði**. 328 s. Tórshavn, Føroya skúlabókagrunnur, Føroya lærarafelag.

Bloch,D. & Fuglø,E. (1999). **Villini súgdjór í Útnorðri**. 216 s. Tórshavn. Føroya skúlabókagrunnur.

Helgi Jacobsen (2011).**Vestmanna søga, bind 1 og 2**, 507+522 s.  Vestmanna, Sprotin.

Patursson, S. (1902). **Fuglaframi**, Nr. 20, Tirsdagin 28. Januar. Offset prent, Emil Thomsen, Tórshavn 1972.



Ofta eru nógvar harur á síggja á flogvøllinum í Vágum. Á hesari myndini síggjast einar 10 harur, sum sita tætt saman. Eitt av starvsfólkunum á Flogvøllinum sigur soleiðis: "*Á hásumri og tíðliga um heysti kunnu vit telja upp til 100 harur, tá vit koyra hegnsýn t.e. tá vit kanna hegnið, sum er rundan um vøllin. So flogvøllurin alir heilt vist nógvar harur. Eisini kann eg nevna at harurnar eru sera tamar, tær vikast ofta ikki. Onkuntíð kunnu vit koma heilt nær (2-3 m) til tær.  Klókar eru tær eisini, tí tá ein ávísur jeppur nærkast (tann sum hevur nr. 01), tá eru tær styggar uppá langan avstand, tí hann er einasta akfar, sum skjýtur (leysaskot) eftir teimum*" (Mynd: Sólja Fríða Jóanisdóttir)

# Appendix

## Haruveiðan 2014

Úrslitini frá teimum einstøku harutúrunum í Føroyum í 2014,
skipað eftir oyggj, bygd, hagaparti og dato.

| *Upplýsingar um harutølini, sum vórðu savnaði fyri veiðitíðina 2014.* | |
|---|---|
| Tal av skotnum harum | 9.318 |
| Tal av harutúrum | 1.123 |
| Tal av hagapørtum | 348 |
| Tal av bygdum | 88 |
| Tal av oyggjum | 15 |
| Tal av heimildarfólkum | 366 |

| Oygg | Bygd | Hagapartur | Dato | Tal av harum | Tal av byrsum |
|---|---|---|---|---|---|
| Fugloy | Hattarvík | Bergið | Ikki skotið | 0 | 0 |
| | | Eystfelli, Uppistovupartur | Ikki skotið | 0 | 0 |
| | | Skarðsvík, Eystfelli, Útistovupartur | 29-11 | 7 | 5 |
| | | Suðurstovuhagi | Ikki skotið | 0 | 0 |
| | | Uttarstovuhagi | Ikki skotið | 0 | 0 |
| | Kirkja | Kirkjuhagi, Norðaripartur | 29-11 | 4 | 5 |
| | | Kirkjuhagi, Sunnaripartur | 29-11 | 4 | 5 |
| | | | 29-12 | 2 | 3 |
| | | Úti í Vík | Ikki skotið | 0 | 0 |
| Svínoy | Svínoy | Bergið | Ikki skotið | 0 | 0 |
| | | Eysturhøvdi | 03-11 | 3 | 1 |
| | | | 04-11 | 2 | 1 |
| | | | 06-12 | 4 | 1 |
| | | | 29-12 | 7 | 2 |
| | | | **Tilsamans** | **16** | **5** |
| | | Fyri handan Fjøll | 21-11 | 3 | 2 |
| | | Fyri handan Hálsar | 27-11 | 14 | 5 |
| | | Handantúnstriðingur, Fyri norðan Ánna | 29-12 | 1 | 2 |
| | | Handantúnstriðingur, Fyri uttan Ánna | 07-11 | 3 | 6 |
| | | | 08-11 | 11 | 6 |
| | | Uppi í Grønu | 15-11 | 4 | 1 |
| | | | 21-11 | 0 | 2 |
| | | Úti í Líð | Ikki skotið | 0 | 0 |

| Oygg | Bygd | Hagapartur | Dato | Tal av harum | Tal av byrsum |
|---|---|---|---|---|---|
| Viðoy | Hvannasund | Í Oyruni | 17-11 | 4 | 2 |
| | | | 13-12 | 2 | 1 |
| | | | 18-12 | 4 | 1 |
| | | | 20-12 | 3 | 1 |
| | | | **Tilsamans** | **13** | **5** |
| | | Úti á Rættini | 03-11 | 6 | 1 |
| | | | 05-11 | 11 | 2 |
| | | | 08-11 | 5 | 2 |
| | | | 20-11 | 4 | 1 |
| | | | 19-12 | 4 | 1 |
| | | | 24-12 | 14 | 6 |
| | | | **Tilsamans** | **44** | **13** |
| | | Yvir í Skorum | Ikki skotið | 0 | 0 |
| | | Yviri á Skarðhamri | 08-11 | 61 | 7 |
| | | | 13-12 | 8 | 1 |
| | | | 20-12 | 8 | 1 |
| | | | 23-12 | 31 | 2 |
| | | | 27-12 | 13 | 1 |
| | | | **Tilsamans** | | |
| | Viðareiði | Bergsmunni | 03-11 | 15 | 3 |
| | | | 05-11 | 2 | 1 |
| | | | 07-11 | 5 | 1 |
| | | | 21-11 | 5 | 4 |
| | | | 30-12 | 15 | 4 |
| | | | **Tilsamans** | **42** | **13** |
| | | Eystur við Egg, Eystastipartur | Ikki skotið | 0 | 0 |
| | | Eystur við Egg, Miðjan | Ikki skotið | 0 | 0 |
| | | Eystur við Egg, Vestastipartur | 03-11 | 18 | 10 |
| | | | 07-11 | 19 | 6 |
| | | | 27-12 | 5 | 1 |
| | | | 29-12 | 2 | 1 |
| | | | **Tilsamans** | **44** | **18** |
| | | Fyri innan Leiti | 08-11 | 10 | 3 |
| | | | 10-11 | 12 | 3 |
| | | | 11-12 | 4 | 5 |
| | | | 23-12 | 8 | 1 |
| | | | **Tilsamans** | **34** | **12** |
| | | Inni í Bergi | 30-12 | 7 | 4 |
| | | Inni í Dølum | 03-11 | 11 | 2 |
| | | | 14-11 | 7 | 3 |
| | | | 01-12 | 6 | 1 |
| | | | 22-12 | 2 | 1 |
| | | | 27-12 | 9 | 3 |
| | | | **Tilsamans** | **35** | **10** |
| | | Inni í Vík, Heimaripartur | 08-11 | 39 | 6 |
| | | | 25-11 | 15 | 6 |
| | | Inni í Vík, Uttaripartur | Ikki skotið | 0 | 0 |
| | | Uppi á Váli | 08-11 | 15 | 3 |
| | | | 10-11 | 7 | 2 |
| | | | 23-12 | 20 | 6 |
| | | | **Tilsamans** | **42** | **11** |

| Oygg | Bygd | Hagapartur | Dato | Tal av harum | Tal av byrsum |
|---|---|---|---|---|---|
| Viðoy | Viðareiði | Úti í Líð | 03-11 | 14 | 10 |
| | | | 07-11 | 5 | 1 |
| | | | 08-11 | 6 | 2 |
| | | | 02-12 | 2 | 1 |
| | | | 31-12 | 2 | 3 |
| | | | **Tilsamans** | **29** | **17** |
| | | Villingardalur | Ikki skotið | 0 | 0 |
| Borðoy | Árnafjørður | Bergið | 10-11 | 12 | 1 |
| | | | 21-11 | 24 | 2 |
| | | | 20-12 | 8 | 1 |
| | | | 29-12 | 7 | 3 |
| | | | 31-12 | 4 | 1 |
| | | | 31-12 | 20 | 3 |
| | | | **Tilsamans** | **75** | **11** |
| | | Fýramarkahagi | 03-11 | 11 | 2 |
| | | | 05-12 | 1 | 1 |
| | | | 13-12 | 17 | 2 |
| | | | 29-12 | 19 | 2 |
| | | | **Tilsamans** | **48** | **7** |
| | | Ognarhagin | 05-11 | 20 | 1 |
| | | | 08-11 | 5 | 1 |
| | | | 18-11 | 5 | 2 |
| | | | 24-11 | 6 | 1 |
| | | | 13-12 | 5 | 1 |
| | | | 20-12 | 30 | 1 |
| | | | 20-12 | 11 | 2 |
| | | | 31-12 | 1 | 1 |
| | | | **Tilsamans** | **83** | **10** |
| | Depil | Breytardalur | 08-11 | 9 | 3 |
| | | | 21-11 | 3 | 3 |
| | | | 24-11 | 1 | 2 |
| | | | 08-12 | 1 | 1 |
| | | | 30-12 | 5 | 2 |
| | | | **Tilsamans** | **19** | **11** |
| | | Húsadalur | 21-11 | 2 | 3 |
| | | | 24-11 | 3 | 2 |
| | | | 08-12 | 1 | 1 |
| | | | 30-12 | 1 | 2 |
| | | | **Tilsamans** | **7** | **8** |
| | | Norðaripartur | Íalt | 14 | |
| | Klaksvík | Akursmørk | 13-12 | 4 | 2 |
| | | Barmur | 20-11 | 4 | 3 |
| | | | 27-11 | 5 | 2 |
| | | | 23-12 | 2 | 2 |
| | | | **Tilsamans** | **11** | **7** |

| Oygg | Bygd | Hagapartur | Dato | Tal av harum | Tal av byrsum |
|---|---|---|---|---|---|
| Borðoy | Klaksvík | Fyri Heiman (í Gerðum) | 08-11 | 13 | 2 |
| | | | 17-11 | 12 | 2 |
| | | | 04-12 | 9 | 2 |
| | | | 06-12 | 9 | 3 |
| | | | 13-12 | 10 | 2 |
| | | | 16-12 | 7 | 2 |
| | | | 20-12 | 3 | 1 |
| | | | 23-12 | 9 | 2 |
| | | | 27-12 | 16 | 5 |
| | | | 29-12 | 2 | 1 |
| | | | 30-12 | 11 | 5 |
| | | | 31-12 | 2 | 4 |
| | | | **Tilsamans** | **103** | **31** |
| | | Hellisdalur | 05-11 | 17 | 2 |
| | | | 01-12 | 6 | 2 |
| | | | 29-12 | 15 | 3 |
| | | | **Tilsamans** | **38** | **7** |
| | | Kvígingadalur | 31-12 | 4 | 2 |
| | | Myrkjanoyrarhagi (Biskupstøðhagin) | 13-11 | 8 | 3 |
| | | | 24-11 | 6 | 2 |
| | | | 20-12 | 18 | 1 |
| | | | 23-12 | 14 | 3 |
| | | | 24-12 | 5 | 3 |
| | | | 27-12 | 5 | 3 |
| | | | **Tilsamans** | **56** | **15** |
| | | Tunghúshagi | 08-12 | 1 | 1 |
| | | Uppsalahagi | 05-11 | 2 | 1 |
| | | | 08-11 | 29 | 7 |
| | | | 17-11 | 2 | 2 |
| | | | 21-11 | 5 | 2 |
